| | |
|---|---|
| **TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**<br>**26. november 2009** | Blað nr.:<br>**8208** |
| | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** **26. november 2009** **kl. 17.00**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr: 227/09-250/09**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Bogi Andreasen
Marin Katrina Frýdal
Jógvan Arge
Elin Lindenskov
Halla Samuelsen
Jákup Símun Simonsen
Rúni M. Djurhuus
Annfinn Brekkstein
Vagnur Johannesen
Levi Mørk
Jan Christiansen
Sjúrður Olsen

**LUTTÓKU IKKI:**
Maria Hammer Olsen, sum hevur biðið um farloyvi

**LUTTÓK EISINI:**
Heri Olsen
Bjørgfríð Ludvig

**SKRIVARI:**
Ingibjørg Berg

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

**MÁL FYRI OPNUM HURÐUM KL. 18.00**

**230/09** **2009-1391**

**Útbygging av Hoyvíkshøllini**

**Býráðið 26. november 2009:** Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini 18. november 2009.

**231/09** **1999-0345**

**Høllin á Hálsi**

**Býráðið 26. november 2009:** Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini 18. november 2009.

**232/09** **2009-0754**

**Ruskinnsavning: Støðutakan til yvirtøka av renovatiónsbilum og útbjóðing av sáttmála**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Verandi sáttmáli um ruskinnsavning við Sp/F Tom Hellisdal gongur út 31. desember 2009.

Tá sáttmálin gongur út, og annar av sáttmálapørtunum ynskir tað, skal arbeiðsánarin (Tórshavnar kommuna) yvirtaka renovatiónsbilarnar, ið ikki eru eldri enn 6 ár. Tað vil siga 2 bilar til húsarhaldsburturkast, ið komu í 2007, og pappírsbilin, ið kom í 2004.
Tann parturin, sum ynskir at arbeiðsánarin yvirtekur bilarnar, skal boða hinum partinum frá hesum í seinasta lagi 6 mánaðir áðrenn sáttmálin gongur út, t.v.s. í seinasta lagi 30. juni 2009.

Yvirtøkuvirðið er grundað á linjurætta avskriving yvir 7 ár. T.v.s. at báðir bilarnir til húsarhaldsburturkast skulu yvirtakast fyri 4/7 av nývirði, sum var umleið 1,1 mió fyri hvønn, og pappírsbilurin skal yvirtakast fyri 1/7 av nývirði, sum var uml. 1,8 mió.

Støða skal tí takast til:

1. Um kommunan ynskir at yvirtaka renovatiónsbilarnar, tá sáttmálin gongur út.
2. Hvussu ruskinnsavningin skal skipast eftir at verandi sáttmáli er farin úr gildi, her verður hugsað um, hvørt ruskinnsavningin skal bjóðast út til arbeiðstakara at reka, ella um kommunan sjálv skal reka innsavningina.

<u>Fyrimunir við útbjóðing:</u>

- Minni umsiting av fyrispurningum, klagum o.t.
- Minni umsiting av starvsfólkamálum.
- Minni umsiting av viðlíkahaldi og rakstri av arbeiðsamboðum. (renovatiónsbilar)
- Kommunan sleppur undan at gera íløgur í kostnaðarmikil arbeiðsamboð (renovatiónsbilar).
- Vandin fyri óvæntaðum útreiðslum, t.d. uppá bilar, er minni.

<u>Vansar við útbjóðing:</u>

- Innsavningarskipanin gerst meiri stirvin, og tað er torførari at gera broytingar, tá arbeiðstøkan er ásett í sáttmála.
- Kommunan rindar MVG av allari sáttmálaupphæddini, og fær einans afturgoldið 75%, harvið gerst arbeiðslønin 6,25% dýrari.
- Rentuútreiðslur av lánum til íløgur í arbeiðsamboð skulu fíggjast.
- Kommunan hevur ikki beinleiðis ræði á arbeiðsamboðum og starvsfólkunum, og í mun til lógarásettu skylduna at hava ruskinnsavning kann hetta vera óheppið í ávísum førum (t.d. konfliktstøður ella fíggjarligir trupulleikar hjá arbeiðstakara).
- Útbjóðing og sáttmálarøkt krevur arbeiðsorku.

<u>Fyrimunur við at kommunan sjálv rekur innsavningina:</u>

- Tað er lættari at gera broytingar í innsavningarskipanini
- Tað skal ikki rindast MVG av arbeiðsløn
- Kommunan fíggjar vanliga sínar íløgur í arbeiðsamboð uttan lántøku og hevur tí ikki rentuútreiðslur.
- Kommunan hevur ræði á arbeiðsamboðum og –fólkunum, og tí er størri trygd fyri at lógarásetta skyldan at hava eina ruskinnsavningarskipan, altíð kann røkjast.
- Kommunan – innsavnarin – borgarin verða tættari knýtt saman, harvið gerst lættari at fáa loyst mál um trupulleikar við innsavningini.

<u>Vansar við at kommunan sjálv rekur innsavningina:</u>

- Meiri umsiting av fyrispurningum, klagum o.t.
- Meiri umsiting av starvsfólkamálum.

- Neyðugt er at seta arbeiðsleiðara/samskipara at taka sær av dagligu leiðsluni og samskipanini av ruskinnsavningini
- Meiri umsiting av viðlíkahaldi og rakstri av arbeiðsamboðum. (renovatiónsbilar)
- Kommunan skal gera íløgur í kostnaðarmikil arbeiðsamboð (renovatiónsbilar).
- Vandin fyri óvæntaðum útreiðslum t.d. uppá bilar er størri.

Útbjóðingartilfar til útbjóðing er í gerð og er komið væl ávegis. Útbjóðingartilfarið byggir á, at komandi arbeiðstakari skal yvitaka renovatiónsbilarnar, sum kommunan yvirtekur frá verandi arbeiðstakara.

Leiðarin á KB kemur at greiða frá gongdini í málinum

**Tilmæli:**
Umsitingin kemur við tilmæli til fundin.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 24. mars 2009:** Nevndin samtykti at ruskinnsavningin skal bjóðast út alment.

Nevndin samtykti eisini, at kommunan yvirtekur renovatiónsbilarnar sambært ásetingunum í sáttmálanum. Nevndin ynskir tó, at tað ikki verður kommunan, men nýggi arbeiðstakarin, ið yvirtekur renovatiónsbilarnar.

Nevndin ynskir at ein eftirmeting av sáttmálaskeiðinum verður gjørd, at leggja fyri nevndina áðrenn farið verður undir útbjóðingina.

**Fíggjarnevndin 30. apríl 2009:** Samtykt at mæla býráðnum at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini 24. mars 2009 við teirri broyting at kommunan ikki yvitekur renovatiónsbilarnar, men at nýggi arbeiðstakarin yvirtekur renovatiónsbilarnar beinleiðis.

**Býráðið 30. apríl 2009:** Einmælt samtykt.

Eftirmeting av sáttmálaskeiðnum, j.nr. 2000-0754/7, verður framløgd. Somuleiðis verður útbjóðingartilfar (j.nr. 2009-0754/9), uppskot til framferðahátt og tíðarætlan (j.nr. 2009-0754/8) framlagt til góðkenningar.

**Tilmæli:**
Leiðarin á Kommunalu Brennistøðini mælir til, at útbjóðingartilfarið, framferðarháttur og tíðarætlanin verður góðkent og arbeiðstøkan boðin út samsvarandi.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 25. august 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

- Almenna licitatiónin var hin 12. oktober 2009, kl. 12.00, hjá Advokatfelagnum við Strond.

Trý tilboð komu inn, hesi eru:

1. Sp/f Sit Con, Inni í Firði 107, Kollafjørður: kr. 9.080.451,00
2. Sp/f Tom Hellisdal, Jørundargøta 44, Hoyvík: kr. 6.803.782,00
3. Sp/f Jón Thomasen, Frammi í Gerði 14, Kvívík: kr. 5.993.565,00

Umframt tilboðsupphæddirnar eru í tilboðunum eisini hjáløgd fylgiskjøl, m.a. ein kravd frágreiðing um veitingartrygd, góðsku av veitingini og tænastu mótvegis borgarunum, og arbeiðsumstøður hjá starvsfólkinum. Øll tilboðini lúka formligu treytirnar, ið settar eru.

Ein arbeiðsbólkur, mannaður við tekniska stjóranum, býarverkfrøðinginum, leiðaranum á heilsu- og umhvøvisdeildini, leiðaranum á Kommunalu Brennistøðini, hevur viðgjørt tilboðini, sí notat j.nr. 2009-0754/22.

Niðurstøðan hjá arbeiðsbólkinum er, at besta boðið er tilboðið frá Sp/f Jón Thomasen.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðinginum, leiðarin á heilsu- og umhvøvisdeildini og leiðarin á Kommunalu Brennistøðini mæla til,

- at tikið verður av tilboðnum frá Sp/f Jón Thomasen og at gjørdur verður ein 5 ára sáttmáli um ruskinnsavning sambært útbjóðingartreytunum.
- at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 3. november 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 9. november 2009:** Vísandi til at lægsta tilboðið hevur arbeiðsorku, sum er munandi minni enn næstlægsta, samtykti nevndin at umsitingin lýsir málið nærri, at leggja fyri nevndina aftur.

**Fíggjarnevndin 18. november 2009:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Sjúrður Olsen, Jógvan Arge samtykti at mæla býráðnum til taka útbjóðingina aftur, vísandi til at mett varð, at ivi kundi verða um veitingartrygdina í tilboðunum.

Ein minniluti, Elin Lindenskov og Marin Katrina Frýdal mælir býráðnum til at taka av lægsta tilboðnum og vísa til samtyktina í heilsu- og umhvørvisnevndini 3. november 2009.

**Býráðið 26. november 2009:** Tikið av skrá.

**233/09** **<u>2009-2761</u>**

**Setan av trivnaðarstjóra**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Nú trivnaðarstjórin seinastu árini er settur í starv sum kommunustjóri, má lýsast eftir nýggjum trivnaðarstjóra.

Í hesum sambandi er uppskot til mannagongd, lýsing og persónsprofil gjørt, ið verður lagt fyri fíggjarnevndina og býráðið til góðkenningar.

**Fíggjarnevndin 28. oktober 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við uppskoti til mannagongd, lýsing og persónsprofil.

**Býráðið 5. november 2009:** Einmælt samtykt at lýsa eftir trivnaðarstjóra við umsóknarfreist mikudagin 25. november 2009 kl. 12:00. Spurningurin um setanarbólk verður viðgjørdur á fyrstkomandi býráðsfundi.

**Fíggjarnevndin 18. november 2009:** Nevndin samtykti at mæla býráðnum til at limir í setanarbólkinum er fíggjarnevndin, ið er starvsfólkanevnd kommununnar saman við kommunustjóranum og einum uttanhýsis ráðgeva, leiðarin á starvsfólkadeildini er skrivari hjá setanarbólkinum.

**Býráðið 26. november 2009:** Fyrst varð atkvøtt um minnilutatilmælið frá Jan Christiansen, ið mælir til at halda fast við uppruna rit til persónprofil, har býráðið velur 3 býráðslimir í setanarbólkin, ið fall við einari atkvøðu fyri og 7 ímóti.

Fyri atkvøddu: Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Kathrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov og Rúni Djurhuus.

Greiddu ikki atkvøðu: Jákup Símun Simonsen, Levi Mørk, Annfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen og Sjúrður Olsen.

Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Kathrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Rúni Djurhuus, Annfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen og Sjúrður Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Jan Christiansen.

**234/09** **2008-1199**

**Endurskoðan av sáttmálanum við Fa. Bussferðir v/Hildur Jensdóttir.**

**Lýsing av málinum- samandráttur:**
Hildur Jensdóttir hevur gjørt vart við at sáttmálin, ið gjørdur var millum táverandi Velbastaðar kommunu og Fa. Bussferðir, eigur at verða endurskoðaður. Víst verður á, at fíggjarligu viðurskiftini ikki eru nøktandi – hetta tí tímaprísurin í sáttmálanum fyri busskoyring er ov lágur. Hildur Jensdóttir hevur á fundum við umsitingina harumframt greitt frá, at túratalið og farleiðirnar eru munandi víðkað í mun til tað, sum sáttmálin upprunaliga legði upp fyri.

Sambært § 2, stk. 2 í sáttmálanum millum kommununa og Bussferðir frá 23. des. 2003 framgongur, at verða fortreytirnar fyri farleiðina munandi broyttar í sáttmálatíðini, t.d. at talið á ferðandi veksur so nógv, at tørvur verður á íløgu í buss/bussar, kann sáttmálin verða tikin upp til samráðingar.

Í § 6 stendur sáttmálin við, til hann av øðrum partinum verður sagdur upp skrivliga við 3 mánaðarliga ávarðing til tann 1. í einum mánaða. Í somu grein stendur eisini, at sáttmálin ikki kann fara úr gildi fyrr enn tann 1. juli 2010.

Grundað á omanfyri standandi hevur Hildur Jensdóttir víst á, at ynski er at samráðast við kommununa um at endurskoða verandi sáttmála.

Sum støðan er í dag, er væntandi at fleiri fara at nýta farleiðina. Tað finnast eingi heilt ítøkilig ferðafólkatøl, men vitandi um at fleiri fólk er flutt til Velbastað, og nógv fleiri børn nú ganga í skúlanum, má roknast við at enn fleiri fara at brúka farleiðina Tó kann staðfestast, at busskoyringin er økt munandi, og í hesum sambandi eru ynski frá m.ø. staðbundnu nevndini um at økja um túratalið. Víst verður í hesum sambandi til mál nr. 2005-0416 Mál viðv. Bussleiðini.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Árligi kostnaðurin fyri skúlabarnakoyring til Velbastað er uml. kr. 450.000,-, ið verður fíggjað av konto 18-5950. Samlaði árligi kostnaðurin fyri skúlabarnakoyring í Tórshavnar kommuna er kr. 2.237.543,-.

Og árligi kostnaðurin fyri býbusskoyring til Velbastað er uml. kr. 879.620,-.

Í verandi sáttmála er tímaprísurin kr. 289,- og henda upphædd er ikki lønandi fyri arbeiðstakaran. Kommunan letur uml. kr. 400-600,- um tíman fyri busskoyring í bussleiðini.

Ì tí nýggja sáttmálanum, sum er komin frá Fa. Bussferðir, er tímataksturin 475,- um tíman.

Umsitingin hevur biðið um uppskot um endurskoðaðan sáttmála frá Fa. Bussferðir. Nýggja uppskotið verður framlagt á fundinum. Orsøkin fyri at neyðugt er at taka støðu til ískoytis sáttmála er, at til verandi koyring krevst ein bussur afturat. Hetta viðførir, at Fa. Bussferðir mugu útvega sær ein nýggjan (brúktan) buss til endamálið.

Eftir sum kommunan hevur ynski um ikki at vera eigari av bussum, tá sáttmálaskeið eru liðin (pr. 1.juli 2010), er neyðugt at ein evt. avskriving av nýggjum útvegaðum bussi skal vera í tíðini, ið eftir er av sáttmálaskeiðinum. Hetta viðførir, at annar tímaprísur eftir øllum at døma verður galdandi vegna ta stuttu tíðina, ið eftir er til avskriving.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at góðkenna sáttmálan.

**Tekniska nevnd 2. apríl 2009:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Jákup Símun Simonsen, Halla Samuelsen og Levi Mørk, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Kostnaðurin av meirnýtsluni er íroknað í umbønini um eykajáttan j.nr. 2009-0575, og vísandi til málið **2008-3983** Endurskoðan av fíggjarætlanini fyri 2009 við atliti til fíggjargongdina higartil, verða sparingar í 2009, eisini gjørdar á leiðini sum Fa. Bussferðir røkir.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2009:** Jákup Egholm Hansen, tekniskur stjóri, kunnaði um støðuna.

**Fíggjarnevndin 25. juni 2009:** Útsett.

**Býráðið 25. juni 2009:** Tikið av skrá.

**Ìskoyti:**
Umsitingin hevur havt fund við Hildur Jensdóttir frá Bussferðir um endurskoðaða sáttmálan.

Bussferðir hevur fingið at vita at Tórshavnar kommuna undir núverandi umstøðum, ikki kann góðtaka ein tímatakst á kr. 475,00. Eftir eitt drúgvt samskifti er Bussferðir gingið við til, at tímataksturin fyri restina av tíðarskeiðinum verður kr. 400,00. Hesin tímatakstur viðførir ikki ein meirkostna fyri sáttmálan við Bussferðir í hesum fíggjarárinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við teknisku nevnd 2. apríl 2009.

**Fíggjarnevndin 9. september 2009:** Ein meiriluti: Heðin Mortensen Elin Lindenskov Jógvan Arge og Jákup Símin Simonsen samtykti at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti: Sjúrður Olsen tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðið 17. september 2009:** Tikið av skrá.

**Býráðið 5. november 2009:** Tikið av skrá.

**Býráðið 26. november 2009:** Tikið av skrá.

**235/09** **2004-1133**

**Høvuðsprojekt: Breiðkan av Marknagilsvegum - Gullak Madsen - (matr. nr. 1216a, Tórshavn)**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Í sambandi við breiðkanina av Marknagilsvegnum. gjørdi umsitingin uppskot til semju um matrikulloysn við fyrrverandi eigararnar av matr. nr. 1216a, sí j.nr. 200200495/6 í sambandi við rættarmálið. Uppskot til semju kostar sambært kostnaðarmetingini hjá P/F Landsbyggifelagnum uml. kr. 325.000,-.

Ognin er nú seld til Gullak Madsen.

Umsitingin hevur gjørt uppskot til nýggja avtalu við Gullak Madsen, sí j.nr. 200301133/1. Uppskot til loysn kostar sambært kostnaðarmetingini hjá P/F Landsbyggifelagnum kr. 310.000,- u/mvg. Gullak Madsen er sinnaður at gjalda ein part av útreiðslunum, og kemur væntandi við viðmerkingum til uppskotið til fundin.

**Tilmæli:**
Umsitingin mælir til at tikið verður undir við uppskoti til avtalu, og at arbeiðið verður boðið út sum undirhondsboð fyri at fáa tann veruliga kostnaðin staðfestan íroknað MVG, projektering, eftirlit og umsiting, at leggja fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 4. mai 2004:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

- Í sambandi við at samráðingar hava verið millum partarnar, er nýtt uppskot komið frá Gullak Madsen, dagf. 26. oktober 2004, sent í teldubrævið til kommununa (j.nr. 200401133/6).

Greitt verður frá uppskotinum.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at nevndin tekur støðu til seinasta uppskotið til avtalu. Ein fortreyt fyri at kommunan møguliga kann ganga umsóknini á møti er at eigarin av grannaognini gevur loyvi til at koyrandi verður eftir privata vegnum á ognini matr. nr. 1215a til Marknagilsvegin.
Verður tikið undir við seinasta uppskotinum frá Gullak Madsen, førir hetta við sær, at kommunan má seta somu treytir til umsókn frá grannanum um frábýti.
Verður ikki tikið undir við seinasta uppskotinum, førir hetta við sær, at kommunan sambært møguligum rættarúrskuri, verður noydd til at laða grótgarð fram við markinum á ognini matr. nr. 1216a við plássi fyri 2 bilum.

**Tekniska nevnd 2. november 2004:** Nevndin samtykti at staðfesta áðurgjørdu samtykt tann 4. mai 2004, til ein loysn viðv. vegætlan í erva fyriliggur.

- Umsitingin hevur havt samráðingar við Gullak Madsen um málið um frámatrikulering av 2 parcellum á útstykkingini matr. nr. 1216a, Tórshavn. Støða ynkist verða tikin til uppskot um avtalu við Gullak Madsen nú, tað vil siga áðrenn ein loysn um vegætlan frá Dánjalstrøð fyriliggur sambært samtykt í teknisku nevnd tann 2. november 2004. Um ikki hetta ber til, er væntandi, at rættarúrskurður verður gjørdur í málinum, sum áleggur kommununi at gera 2 bilstøðlar fram við ognini hjá Gullak Madsen (fyrrverandi eigarar systrarnar Dam). Henda loysnin eru hvørki Gullak Madsen ella kommunan fegin um at fara undir, og mett verður tí, at um partarnir kunnu semjast um fyriliggjandi uppskot um avtalu, fer hetta at verða ein betri loysn fyri báðar partar. Avtalan byggir tó á, at eigarin av grannaognini, Erling Johannesen, gevur sítt tilmæli at Gullak Madsen kann nýta atkomuvegin á hansara ogn sum fyribilsveg til Marknagilsvegin. Fyriliggjandi uppskot til avtalu við Gullak Madsen byggir upp á fylgjandi:

Gullak Madsen sleppur at frámatrikulera 2 stykki á trøðni matr. nr. 1216a, Tórshavn, men aftur fyri skulu fylgjandi treytir uppfylgjast:

1. Umsøkjarin letur gera eina útstykkingarætlan fyri alla trøðna.
2. Umsøkjarin letur tinglýsa eina deklaratión um at eigarin av trøðni fær loyvi at binda atkomuveg í Marknagilsvegin sum eina fyribilsloysn – til atkomuvegur úr erva, tvs. úr Dánjalstrøð verður gjørdur.
3. Umsøkjandin skal, tá ið vegurin er gjørdur úr Dánjalstrøð, rinda fyri kostnaðin at umleggja vegatkomuna úr Marnagilsvegnum til nýggja atkomuvegin.
4. Kostnaðurin fyri vegin í erva er tengdur at góðkendu útstykkingarætlanini og umfatar vegarbeiðið á trøðni matr. nr. 1216a, Tórshavn.
5. Kommunan fer undir atkomuvegin úr Dánjalstrøð til vesturmarkið á ognini hjá E. Johannesen, matr. nr. 1215a, Tórshavn í 2007.
6. Tá ið kommunan hevur latið gera vegin, skal eigarin beinan vegin fara undir sín part av vegagerðini í tráð við útstykkingarætlanina og sostatt broyta atkomuvðiurskiftini til Marknagilsvegin uttan kostnað fyri kommununa.
7. Umsøkjarin veitir eina bankatrygd fyri vegarbeiðið álj. kr. 1,3 mió. fyri býlingavegin. (Sethúsa- ella íbúðarvegirnir eru ikki íroknaðir).

8. Fer umsøkjarin ikki undir vegarbeiðið beinan vegin, tá ið kommunan er liðug við sín part av vegarbeiðinum, tilskilar kommunan sær rætt til at lata vegin gera fyri eigarans rokning. (kommunan tilskilar sær harumframt rætt til at áleggja 25% í mvg fyri vegarbeiðið).
9. Avtalan við umsøkjaran, um at hann kann nýta vegatkomu til Marknagilsvegin, er treytað av at grannin E. Johannesen gevur sítt tilmæli.

Umsitigin leggur fram uppskot til avtalu og greiðir frá.

**Tilmæli:**
Vísandi til at byggi- og býarskipanarnevndin tann 29. november 2004 og tekniska nevndin 14. desember 2004 (sí mál nr. 200401071) hava samtykt at játta frámatrikulering á grannaognini hjá E. Johannesen, matr. nr. 1215a við treytum, mælir býarverkfrøðingurin til at taka undir við framlagda uppskoti til avtalu við Gullak Madsen, eigara av matr. nr. 1216a, Tórshavn, og at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Tekniska nevnd 2. juni 2005:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at taka undir við teknisku nevnd.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. juni 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Í tilgongdini at fáa í lag semju við partarnar, hevur umsitingi gjørt endurskoðað uppskot til avtalu (2004-1133/23), sum byggir á broytingar av ymsum matrikulerum og tekniskum viðurskiftum. Harumframt byggir uppskotið á ymisk krøv frá umsitingini í mun til tað fyrra uppskotið til avtalu (2004-1133/11).
Umsitignin kemur, saman við løgfrøðingi, at greiða frá gongdini í málinum

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at góðkenna uppskot nr. (2004-1133/24).

**Tekniska nevnd 5. februar 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina vísandi til pkt. nr. 16 og 17 í avtaluni.
**Fíggjarnevndin 11. februar 2009:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd við teirri treyt, at hinir partarnir í samlaða vegastrekkinum binda seg til at luttaka í samlaða projektinum, tá byrja verður. Hvør partur rindar fyri vegagerð á sínum matrikli.

**Ískoyti:**

Umsitingin hevur umvegis advokat kommununar í málinum, vent sær til Gullak Madsen fyri at fáa váttan fyri, at gjørt verður eitt felags vegaprosjekt og at arbeiði verður gjørt sambært samtykt fíggjarnevndarinnar hin 11. februar 2009.

**Tilmæli:**
Tilmæli kemur til fundin.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2009:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Vísandi til grein 19 í avtalu við Simag Aps v/Gulak Madsen (og part av avtalu viðv. grannaognini hjá Erling Johannesen) j. nr /242004-1133/34 verður uppskotið til avtalu við hesum lagt fyri býráðið, til góðkenningar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla býráðnum til at góðkenna avtalu við hesum treytum:

1. at kommununar partur verður gjørdur í 2010 og ikki 2009, sum avtalan sigur
2. at allir partarnir binda seg til, at gjørt verður felags projekt, útbjóðing og gerð av atkomuvegum í einum,

**Býráðið 26. november 2009:** Einmælt samtykt.

**236/09** **2004-1081**

**Erling Johannesen: Umsókn og uppskot til útstykkingarætlan fyri matr. nr. 1215a við Marknagilsvegin**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Ì sambandi við útstykkingarætlan á ognini hjá Erling Johannesen, matr. nr. 1215a, eru tekningar sendar teknisku fyrisitingini til góðkenningar, sí skjal nr. 10, sum er matrikulplanur, vegplanur og tvørskurðar av vegaføringum. Útstykkingarvegurin gjøgnum matr. nr. 1215a er gjørdur í neyvum samstarvi við P/F Landsbyggifelagið, sum stendur fyri projekteringini av útstykkingarvegnum úr Dánjalstrøð og eystur til markið av matr. nr. 1215a.
Tekniska umsiting tryggjar sær, at ásetingarnar í byggisamtyktini eru fylgdar, og tekniska deild eftirhyggur og endaliga góðkennur tað lidna tekniska projektið saman við byggideildini, áðrenn endaligt loyvi verður givið til at útstykkja eftir.

Tekniska nevnd hevur viðgjørt mál nr. 2001-0152 tann 8. desember 2005, sum snýr seg um treytirnar fyri at sleppa at stykkja út á matr. nr. 1215a. Víst verður til

uppskot til avtalur millum Erling Johannesen og Tórshavnar kommunu í hesum sambandi, sí j. nr. 2001-0152/10.

Málið verður lagt fyri í byggi- og býarskipanarnevndina tann 3. apríl 2006 og verður víst til samtyktina í byggi- og býarskipanarnevndini.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at nevndin tekur undir við fyriliggjandi útstykkingarætlan, við teirri treyt, at ásetingarnar í byggisamtyktini eru fylgdar, og tekniska deild eftirhyggur og endaliga góðkennur tað lidna tekniska projektið saman við byggideildini, áðrenn endaligt loyvi verður givið til at útstykkja eftir.

**Tekniska nevnd 6. apríl 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at góðkenna útstykkingarætlanina sambært skjali 2004-1081/10. Harumframt verður mælt til at taka undir við tilmælinum frá býarverkfrøðinginum til fundin í teknisku nevnd 6. apríl 2006. Viðvíkjandi avtaluni um í hvørjum stigum útstykkingin verður framd, skal henda avtala (2001-0152/10) verða undirskrivað av báðum pørtum innan arbeiðið kann byrja.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 1. mai 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur á fundi mánadagin 9. juni 2009 við umboð fyri Erling Johannesen greitt frá gongdini í málinum, sí fundarfrásøgn j. nr. 2001-0152/19. Kunnað varð um, at fíggjarnevndin krevur trygd fyri, at vegurin skal gerast liðugur, áðrenn byggiloyvi verða útvegað. Umboðini fyri Erling Johannesen vóru ikki sinnaði at stillað bankatrygd, men skutu upp, at kommunan fekk trygd fyri gerð av vegnum við at tinglýsa veð í ognini, matr. nr. 1215a, Tórshavn.

Víst verður eisini til undirskrivaðar avtalur millum Erling Johannesen og Tórshavnar kommunu, sí j. nr. 2001-0152/17 og 18.

**Tilmæli.**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at nevndin tekur støðu til uppskotið um slag av trygd.

Somuleiðis verður mælt til, at fíggjarnevndin gevur umsitingini heimild at gera endaliga útstykkingarætlan fyri kommunalu ognirnar framvið vegnum úr Dánjalstrøð at leggja fyri byggi- og býarskipanarnevndina og teknisku nevnd til góðkenningar, og at grundstykkini hareftir kunnu bjóðast út í fríari sølu.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2009:** Samtykt at ánararnir av útstykkingarætlan fyri matr. nr. 1215a skulu seta bankatrygd, tá farið verður í gongd við at gera vegin, og eisini samtykt at taka undir við tilmælinum um at gera endaliga útstykkingarætlan

fyri kommunalu ognirnar framvið vegnum úr Dánjalstrøð at leggja fyri byggi- og býarskipanarnevndina og teknisku nevnd til góðkenningar, og at grundstykkini hareftir kunnu bjóðast út í fríari sølu, og at játta kr. 150.000,00 av konto 90, til at gera útbjóðingartilfar.

Málið verður lagt fyri býráðið.

**Býráðið 25. juni 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Býráðið hevði tann 25. juni 2009 samtykt at seta ánarunum eina bankatrygd áðrenn farið verður undur at gera vegin. Í sambandi við tilgongdina at fáa góðkent treytirnar í sambandi við útstykkingætlanina, skal býráðið harumframt staðfesta endaligu góðkenningina av avtalunum við smærri broytingum. Í omanfyri standandi teksti verður víst til undirskrivaðar avtalur millum Erling Johannesen og Tórshavnar kommunu, j. nr. 2001-0152/17 og 18. Rætta j. nr skal vera 2001-0152/15 og 16.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla býráðnum til at staðfesta samtyktinar í teknisku nevnd 6. apríl 2006 og í byggi- og býarskipanarnevndini 1. mai 2006.

**Býráðið 26. november 2009:** Einmælt samtykt við hesum treytum:

1 at kommununar partur verður gjørdur í 2010 og ikki 2009
2 at allir partarnir binda seg til, at gjørt verður felags projekt, útbjóðing og gerð av atkomuvegum í einum,

**237/09** **<u>2009-2795</u>**

**<u>Broyting av orðingum í ásetingnum um A1-øki í almennu byggisamtyktini.</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Umsitingin hevur í seinastuni fingið fleiri fyrispurningar um sundurbýti av sethúsum til eigaraíbúðir.

Ásetingar fyri umráðispartarnar A1 í 3. grundumráði.

1. Loyvt er einans at byggja stakhús við í mesta lagi tveimum íbúðum og - eftir serloyvi frá byggivaldinum - tvíhús, raðhús og ketuhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski.”

Henda áseting er ætlað til, og hevur altíð verið tulkað soleiðis, at loyvt er at innrætta "sekunderara" íbúð í kjallara ella á lofti í sethúsum. Orðingin skal soleiðis síggjast í ljósinum av, at heldur enn at byggisamtyktin einki ásetir um íbúðir, og harvið ikki loyvir teimum, so er við ásetingini loyvt at byggja/gera tílíkar íbúðir. Hesar íðbúðir eru serliga ætlaðar til børn ella foreldur at eigaranum at búgva í og til leigu. Tað er eisini vanligt, at stórur partur av kjallara stendur omaná jørð, og at hesin partur verður nýttur til slíkar íbúðir. Hinvegin er ætlanin við ásetingini í byggisamtyktini á ongan hátt at loyva, at vanlig sethús verða til tvær sjálvstøðugar ognir, við teimum avleiðingum og krøvum, ið har til hoyra.

Í byggisamtyktarhøpi er eisini umráðandi at halda fast við hesa fatan av hugtakinum, tí um fleiri hús í einum verandi býarparti vera sundurbýtt í eigaraíbúðir, kann dámurin av økinum broytast munandi, við t.d. fleiri bilum og tættari bygging. Her skal man eisini hava í huga, at tað helst eru fólk í býlinginum, sum ynskja at búgva í einum vanligum sethúsabýlingi og tí hava keypt hús júst her.

Fyri at forða fyri at fleiri hús í A1-økinum verða sundurbýtt í eigaraíbúðir mælir umsitingin til at ásetingarnar fyri A1-øki í almennu byggisamtyktini verður broyttar frá:

1. Loyvt er einans at byggja stakhús við í mesta lagi tveimum íbúðum og - eftir serloyvi frá byggivaldinum - tvíhús, raðhús og ketuhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski."

Til:

1. Loyvt er einans at byggja eini stakhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, sum tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð, og - eftir serloyvi frá byggivaldinum - tvíhús, raðhús og ketuhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at ásetingarnar fyri A1-øki í almennu byggisamtyktini verða broyttar frá:

1. Loyvt er einans at byggja stakhús við í mesta lagi tveimum íbúðum og - eftir serloyvi frá byggivaldinum - tvíhús, raðhús og ketuhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski."

Til:

1. Loyvt er einans at byggja eini stakhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, sum tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð, og - eftir serloyvi frá byggivaldinum - tvíhús, raðhús og ketuhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski

**Byggi- og býarskipanarnevndin 9. november 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 26. november 2009:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Kathrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Annfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Rúni Djurhuus.

**238/09** **2009-1377**

**Fíggjarætlanin 2010 hjá Tórshavnar kommunu**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært kommunustýrisskipanini skal fíggjarnevndin fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri kommunustýrið til komandi fíggjarætlan.

Kommunustýrið skal viðgera uppskotið til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili.

Fíggjarætlanin skal verða endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.

Uppskotið verður borið fíggjarnevndarlimum í dag.

**Fíggjarnevndin 28. september 2009:** Samtykt at leggja fíggjarætlanina fyri býráðið.

**Býráðið 30. september 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu at beina fíggjarætlanina í nevndirnar til viðgerðar.

**Fíggjarætlanin fyri 2010.**

**Yvirlit**

# Høvuðsyvirlit

| **Høvuðsyvirlit yvir fíggjarætlan** | | | | | **2010** |
|---|---|---|---|---|---|
| | | | Rakstrarætlan | | Løgu- |
| Tús. kr. | | | Útreiðslur | Inntøkur | ætlan |
| **§ 1.** | **Kommunal fyrisiting** | | **74.957** | - | - |
| | 11. | Felagsútreiðslur | 71.599 | - | - |
| | 18. | Almenn starvsfólk v.m. | 3.358 | - | - |
| **§ 2.** | **Almanna- og heilsumál** | | **41.197** | - | **23.000** |
| | 20. | Heilsumál | 14.875 | - | - |
| | 21. | Almannamál | 26.322 | - | 23.000 |
| **§ 3.** | **Børn og ung** | | **141.422** | - | **1.000** |
| | 24. | Mentan | 5.163 | - | - |
| | 26. | Barnaansing | 136.259 | - | 1.000 |
| **§ 4.** | **Undirvísing** | | **39.634** | - | **99.500** |
| | 23. | Útbúgving og gransking | 39.634 | - | 99.500 |
| **§ 5.** | **Mentan og frítíð** | | **39.025** | - | **7.000** |
| | 23. | Útbúgving og gransking | 10.585 | - | - |
| | 24. | Mentan | 28.440 | - | 7.000 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **§ 6.** | **Teknisk mál** | | **113.744** | **-** | **6.873** |
| | 11. | Felagsútreiðslur | 52.230 | - | -5.000 |
| | 22. | Íbúðarmál | - | - | 16.153 |
| | 24. | Mentan | 2.770 | - | 2.000 |
| | 30. | Umhvørvi | 24.042 | - | 4.000 |
| | 37. | Handil og vinna annars | - | - | -16.153 |
| | 38. | Samferðsla og samskifti | 34.702 | - | 5.873 |
| **§ 7.** | **Kommunal virki** | | **26.345** | **-** | **30.200** |
| | 30. | Umhvørvi | 18.247 | - | 7.000 |
| | 31. | Tilbúgving | 7.913 | - | - |
| | 37. | Handil og vinna annars | 3.315 | - | - |
| | 38. | Samferðsla og samskifti | -3.130 | - | 23.200 |
| **Tilsamans** | | | **476.324** | **-** | **167.573** |
| § 20. | 22. | Íbúðarmál | 28.000 | - | - |
| § 20. | 50. | Rentur | 10.265 | 1.500- | - |
| § 20. | 52. | Skattir og avgjøld | - | 631.903 | - |
| Tilsamans | | | 514.589 | 633.403 | 167.573 |
| Yvirskot | | | - | 118.814 | - |

| | Útreiðslur | Inntøkur | Yvirskot |
|---|---|---|---|
| **Rakstrar-, løgu- og útlánsætlan RLÚ** | **-** | **-48.759** | **-** |

Fígging:

**Tekstur**

# § 1 Kommunal fyrisiting

## A. Yvirlit

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 74.957 | 74.957 | - |
| **Felagsútreiðslur** | | **71.599** | **-** |
| 1.11.11. Samsýningar o.a. til kommunustýrislimir | | 2.676 | - |
| 1.11.12. Val og valnevndir | | 50 | - |
| 1.11.14. Kommunufyrisitingin | | 67.795 | - |
| 1.11.21. Kommunufeløg | | 1.078 | - |
| **Almenn starvsfólk v.m.** | | **3.358** | **-** |
| 1.18.11. Tænastumannaeftirlønir | | 3.358 | - |

*Yvirlit yvir høvuðssløg:*

| | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|
| Játtan tilsamans | 74.957 | - |
| Nettostýrt virksemi | 3.648 | 3.648 |
| Virksemi tilsamans | 78.605 | 3.648 |
| Rakstrarútreiðslur | 72.887 | - |
| Rakstrarinntøkur | - | 3.648 |
| Flytingarútreiðslur | 4.436 | - |
| Flytingar millum almennar myndugleikar | 1.282 | - |

## B. Játtanir

Útreiðslur Inntøkur
- Tús. kr. -

## Felagsútreiðslur

| | | | |
|---|---|---|---|
| **1.11.11.** | **Samsýningar o.a. til kommunustýrislimir** | | |
| 110. | Samsýningar o.a. til kommunustýrislimir (Rakstrarj.) | 2.676 | - |
| **1.11.12.** | **Val og valnevndir** | | |
| 110. | Val og valnevndir (Rakstrarj.) | 50 | - |
| **1.11.14.** | **Kommunufyrisitingin** | | |
| 110. | Kommunufyrisitingin (Rakstrarj.) | 67.795 | - |
| **1.11.21.** | **Kommunufeløg** | | |
| 110. | Kommunufeløg | 1.078 | - |

## Almenn starvsfólk v.m.

| | | | |
|---|---|---|---|
| **1.18.11.** | **Tænastumannaeftirlønir** | | |
| 110. | Eftirlønir | 3.358 | - |

# § 2 Almanna- og heilsumál

## A. Yvirlit

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 41.197 | 41.197 | - |
| Løguætlan | 23.000 | 23.000 | - |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Heilsumál** | | **14.875** | **-** |
| 2.20.21. | Ymiskar heilsuútreiðslur | 1.555 | - |
| 2.20.22. | Kommunulækna- og heilsutænastur | 2.842 | - |
| 2.20.23. | Tannrøkt | 10.478 | - |
| **Almannamál** | | **49.322** | **-** |
| 2.21.12. | Ymiskar almannaútreiðslur | 250 | - |
| 2.21.13. | Stuðul til endamál innan almanna- og heilsumál | 393 | - |
| 2.21.31. | Barnavernd | 16.986 | - |
| 2.21.61. | Eldrarøkt | 25.132 | - |
| 2.21.62. | Tilboð og tiltøk til eldri | 2.761 | - |
| 2.21.72. | Forsorg | 3.800 | - |

*Yvirlit yvir høvuðssløg:*

| | | |
|---|---|---|
| Játtan tilsamans | 64.197 | - |
| Nettostýrt virksemi | 50.082 | 50.082 |
| Virksemi tilsamans | 114.279 | 50.082 |
| Rakstrarútreiðslur | 79.962 | - |
| Rakstrarinntøkur | - | 1.913 |
| Løguútreiðslur | 21.647 | - |
| Flytingarútreiðslur | 6.493 | - |
| Flytingar millum almennar myndugleikar | 6.177 | 48.169 |

## B. Játtanir

| | | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. kr. - | |

## Heilsumál

| | | | |
|---|---|---|---|
| **2.20.21.** | **Ymiskar heilsuútreiðslur** | | |
| 110. | Ymiskar heilsuútreiðslur (Rakstrarj.) | 1.555 | - |
| **2.20.22.** | **Kommunulækna- og heilsutænastur** | | |
| 110. | Kommunulækna- og heilsutænastur (Rakstrarj.) | 2.842 | - |
| **2.20.23.** | **Tannrøkt** | | |
| 110. | Tannrøkt (Rakstrarj.) | 10.478 | - |

## Almannamál

| | | | |
|---|---|---|---|
| **2.21.12.** | **Ymiskar almannaútreiðslur** | | |
| 110. | Stuðul til endamál innan almanna- og heilsumál | 250 | - |
| **2.21.13.** | **Stuðul til endamál innan almanna- og heilsumál** | | |
| 110. | Ymiskar almannaútreiðslur (Rakstrarj.) | 393 | - |
| **2.21.31.** | **Barnavernd** | | |
| 110. | Barnavernd (Rakstrarj.) | 16.986 | - |
| **2.21.61.** | **Eldrarøkt** | | |
| 110. | Eldrarøkt (Rakstrarj.) | 2.132 | - |
| 111. | Eldrarøkt (Løguj.) | 23.000 | - |
| **2.21.62.** | **Tilboð og tiltøk til eldri** | | |
| 110. | Tilboð og tiltøk til eldri (Rakstrarj.) | 2.761 | - |
| **2.21.72.** | **Forsorg** | | |
| 110. | Forsorg (Rakstrarj.) | 3.800 | - |

# § 3 Børn og ung

## A. Yvirlit

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 141.422 | 141.422 | - |
| Løguætlan | 1.000 | 1.000 | - |
| **Mentan** | | **5.163** | **-** |
| 3.24.12. Tilboð og tiltøk til børn og ungdóm | | 5.163 | - |
| **Barnaansing** | | **137.259** | **-** |
| 3.26.11. Barnaansing | | 137.259 | - |

*Yvirlit yvir høvuðssløg:*

| | | |
|---|---|---|
| Játtan tilsamans | 142.422 | - |
| Nettostýrt virksemi | 33.046 | 33.046 |
| Virksemi tilsamans | 175.468 | 33.046 |

| | | |
|---|---|---|
| Rakstrarútreiðslur | 148.298 | - |
| Rakstrarinntøkur | - | 33.046 |
| Løguútreiðslur | 941 | - |
| Flytingarútreiðslur | 21.920 | - |
| Flytingar millum almennar myndugleikar | 4.309 | - |

# B. Játtanir

Útreiðslur Inntøkur
- Tús. kr. -

## Mentan

| | | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| **3.24.12.** | **Tilboð og tiltøk til børn og ungdóm** | | |
| 110. | Tilboð og tiltøk til børn og ung (Rakstrarj.) | 5.163 | - |

## Barnaansing

| | | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| **3.26.11.** | **Barnaansing** | | |
| 110. | Barnaansing (Rakstrarj.) | 114.485 | - |
| 111. | Barnaansing (Løguj.) | 1.000 | - |
| 112. | Aðrar útreiðslur í samband við barnaansing (Rakstrarj.) | 21.774 | - |

# § 4 Undirvísing

# A. Yvirlit

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 39.634 | 39.634 | - |
| Løguætlan | 99.500 | 99.500 | - |

| | | |
|---|---|---|
| **Útbúgving og gransking** | **139.134** | **-** |
| 4.23.22. Fólkaskúlin | 138.199 | - |
| 4.23.31. Endurgjald til lærlingaútreiðslur | 935 | - |

*Yvirlit yvir høvuðssløg:*

| | | |
|---|---|---|
| Játtan tilsamans | 139.134 | - |
| Nettostýrt virksemi | 77 | 77 |
| Virksemi tilsamans | 139.211 | 77 |

| | | |
|---|---|---|
| Rakstrarútreiðslur | 33.896 | - |
| Rakstrarinntøkur | - | 77 |
| Løguútreiðslur | 93.647 | - |
| Flytingarútreiðslur | 1.469 | - |
| Flytingar millum almennar myndugleikar | 10.199 | - |

# B. Játtanir

Útreiðslur Inntøkur
- Tús. kr. -

## Útbúgving og gransking

| | | | |
|---|---|---|---|
| **4.23.22.** | **Fólkaskúlin** | | |
| 110. | Fólkaskúlin (Rakstrarj.) | 34.545 | - |
| 111. | Fólkaskúlin (Løguj.) | 99.500 | - |
| 112. | Verkætlanir og aðrar útreiðslur á fólkaskúlaøkinum (Rakstrarj.) | 4.154 | - |
| **4.23.31.** | **Endurgjald til lærlingaútreiðslur** | | |
| 110. | Endurgjald til lærlingaútreiðslur (Rakstrarj.) | 935 | - |

# § 5 Mentan og frítíð

## A. Yvirlit

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr | | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | | 39.025 | 39.025 | - |
| Løguætlan | | 7.000 | 7.000 | - |
| **Útbúgving og gransking** | | | **10.585** | **-** |
| 5.23.51. | Musikkskúlin | | 6.603 | - |
| 5.23.52. | Kvøld- og listaskúlar | | 3.982 | - |
| **Mentan** | | | **35.440** | **-** |
| 5.24.13. | Tilboð og tiltøk innan mentan og frítíð | | 2.885 | - |
| 5.24.14. | Stuðul til ítróttar- og mentanarendamál | | 7.362 | - |
| 5.24.31. | Bókasavn | | 5.932 | - |
| 5.24.32. | Søvn og mentanararvur | | 74 | - |
| 5.24.61. | Svimjihøllin | | 5.529 | - |
| 5.24.62. | Ítróttaranlegg | | 13.658 | - |

*Yvirlit yvir høvuðssløg:*

| | | |
|---|---|---|
| Játtan tilsamans | 46.025 | - |
| Nettostýrt virksemi | 14.704 | 14.704 |
| Virksemi tilsamans | 60.729 | 14.704 |
| Rakstrarútreiðslur | 45.452 | - |
| Rakstrarinntøkur | - | 6.520 |
| Løguútreiðslur | 6.589 | - |
| Flytingarútreiðslur | 7.362 | - |
| Skattir og flytingarinntøkur | - | 100 |
| Flytingar millum almennar myndugleikar | 1.326 | 8.084 |

## B. Játtanir

Útreiðslur Inntøkur
- Tús. kr. -

## Útbúgving og gransking

| | | | |
|---|---|---|---|
| **5.23.51.** | **Musikkskúlin** | | |
| 110. | Musikkskúlin (Rakstrarj.) | 6.603 | - |
| **5.23.52.** | **Kvøld- og listaskúlar** | | |
| 110. | Kvøld- og listaskúlar (Rakstrarj.) | 3.982 | - |

## Mentan

| | | | |
|---|---|---|---|
| **5.24.13.** | **Tilboð og tiltøk innan mentan og frítið** | | |
| 110. | Tilboð og tiltøk innan mentan og frítíð (Rakstrarj.) | 2.885 | - |
| **5.24.14.** | **Stuðul til ítróttar- og mentanarendamál** | | |
| 110. | Stuðul til ítróttar- og mentanarendamál | 4.840 | - |
| 111. | Stuðul til íløgur | 2.522 | - |
| **5.24.31.** | **Bókasavn** | | |
| 110. | Bókasavn (Rakstrarj.) | 5.932 | - |
| **5.24.32.** | **Søvn og mentanararvur** | | |
| 110. | Søvn og mentanararvur (Rakstrarj.) | 74 | - |
| **5.24.61.** | **Svimjihøllin** | | |
| 110. | Svimjihøllin (Rakstrarj.) | 5.529 | - |
| **5.24.62.** | **Ítróttaranlegg** | | |
| 110. | Ítróttaranlegg (Rakstrarj.) | 6.658 | - |
| 111. | Ítróttaranlegg (Løguj.) | 7.000 | - |

# § 6 Teknisk mál

## A. Yvirlit

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 113.744 | 113.744 | - |
| Løguætlan | 6.873 | 41.053 | 34.180 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Felagsútreiðslur** | | **55.230** | **8.000** |
| 6.11.31. | Umsiting og røkt av fastognum | 43.880 | 8.000 |
| 6.11.32. | Fríðkan av kommununi | 11.350 | - |
| **Íbúðarmál** | | **22.480** | **6.327** |
| 6.22.11. | Byggibúning bústaðir | 22.480 | 6.327 |
| **Mentan** | | **4.770** | **-** |
| 6.24.51. | Kirkjugarður | 4.770 | - |
| **Umhvørvi** | | **28.042** | **-** |
| 6.30.11. | Umhvørvistiltøk v.m. | 2.458 | - |
| 6.30.21. | Vatnveiting | 6.321 | - |
| 6.30.41. | Kloakkir | 19.263 | - |
| **Handil og vinna annars** | | **3.700** | **19.853** |
| 6.37.11. | Byggibúning ídnaðarøki | 3.700 | 19.853 |
| **Samferðsla og samskifti** | | **40.575** | **-** |
| 6.38.11. | Vegir | 22.021 | - |
| 6.38.12. | Gøtuljós | 6.958 | - |
| 6.38.13. | Rakstrargøgn | 11.596 | - |

*Yvirlit yvir høvuðssløg:*

| | | |
|---|---|---|
| Játtan tilsamans | 154.797 | 34.180 |
| Nettostýrt virksemi | 5.238 | 5.238 |
| Virksemi tilsamans | 160.035 | 5.238 |
| Rakstrarútreiðslur | 113.670 | - |
| Rakstrarinntøkur | - | 5.238 |
| Løguútreiðslur | 38.524 | - |
| Løguinntøkur | - | 34.180 |
| Flytingarútreiðslur | 600 | - |
| Flytingar millum almennar myndugleikar | 7.241 | - |

# B. Játtanir

| | | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. kr. - | |

## Felagsútreiðslur

| | | | |
|---|---|---|---|
| **6.11.31.** | **Umsiting og røkt av fastognum** | | |
| 110. | Umsiting og røkt av fastognum (Rakstrarj.) | 43.880 | - |
| 111. | Umsiting og røkt av fastognum (Løguj.) | - | 8.000 |
| **6.11.32.** | **Fríðkan av kommununi** | | |
| 110. | Fríðkan av kommununi (Rakstrarj.) | 8.350 | - |
| 111. | Fríðkan av kommununi (Løguj.) | 3.000 | - |

## Íbúðarmál

| | | | |
|---|---|---|---|
| **6.22.11.** | **Byggibúning bústaðir** | | |
| 110. | Byggibúning bústaðir (Løguj.) | 22.480 | 6.327 |

## Mentan

| | | | |
|---|---|---|---|
| **6.24.51.** | **Kirkjugarður** | | |
| 110. | Kirkjugarðar (Rakstrarj.) | 2.770 | - |
| 111. | Kirkjugarðar (Løguj.) | 2.000 | - |

## Umhvørvi

| | | | |
|---|---|---|---|
| **6.30.11.** | **Umhvørvistiltøk v.m.** | | |
| 110. | Umhvørvistiltøk v.m. (Rakstrarj.) | 2.458 | - |
| **6.30.21.** | **Vatnveiting** | | |
| 110. | Vatnveiting (Rakstrarj.) | 6.321 | - |
| **6.30.41.** | **Kloakkir** | | |
| 110. | Kloakkir (Rakstrarj.) | 15.263 | - |
| 111. | Kloakkir (Løguj.) | 4.000 | - |

## Handil og vinna annars

| | | | |
|---|---|---|---|
| **6.37.11.** | **Byggibúning ídnaðarøki** | | |
| 110. | Byggibúning ídnaðarøki (Løguj.) | 3.700 | 19.853 |

## Samferðsla og samskifti

| | | | |
|---|---|---|---|
| **6.38.11.** | **Vegir** | | |
| 110. | Vegir (Rakstrarj.) | 21.021 | - |
| 111. | Vegir (Løguj.) | 1.000 | - |
| **6.38.12.** | **Gøtuljós** | | |
| 110. | Gøtuljós (Rakstrarj.) | 6.958 | - |
| **6.38.13.** | **Rakstrargøgn** | | |
| 110. | Rakstrargøgn (Rakstrarj.) | 6.723 | - |
| 111. | Rakstrargøgn (Løguj.) | 4.873 | - |

# § 7 Kommunal virki

## A. Yvirlit

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 26.345 | 26.345 | - |
| Løguætlan | 30.200 | 30.200 | - |
| **Umhvørvi** | | **25.247** | **-** |
| 7.30.42. Renovasjón | | 25.247 | - |
| **Tilbúgving** | | **7.913** | **-** |
| 7.31.11. Sløkkiliðið | | 7.913 | - |
| **Handil og vinna annars** | | **3.315** | **-** |
| 7.37.51. Vinnumenning | | 3.315 | - |
| **Samferðsla og samskifti** | | **20.070** | **-** |
| 7.38.14. Havnir og lendingar | | 0 | - |
| 7.38.21. Bussleiðin | | 20.570 | - |
| 7.38.22. Parkeringsskipanin | | -500 | - |

*Yvirlit yvir høvuðssløg:*

| | | |
|---|---|---|
| Játtan tilsamans | 56.545 | - |
| Nettostýrt virksemi | 73.038 | 73.038 |
| Virksemi tilsamans | 129.583 | 73.038 |
| Rakstrarútreiðslur | 91.588 | - |
| Rakstrarinntøkur | - | 64.038 |
| Løguútreiðslur | 29.788 | - |
| Flytingarútreiðslur | 4.795 | - |
| Skattir og flytingarinntøkur | - | 4.500 |
| Flytingar millum almennar myndugleikar | 3.412 | 4.500 |

## B. Játtanir

Útreiðslur Inntøkur
- Tús. kr. -

**Umhvørvi**

| | | | |
|---|---|---|---|
| **7.30.42.** | **Renovasjón** | | |
| 110. | Renovasjón (Rakstrarj.) | 18.247 | - |
| 111. | Renovasjón (Løguj.) | 7.000 | - |

## Tilbúgving

| | | | |
|---|---|---|---|
| **7.31.11.** | **Sløkkiliðið** | | |
| 110. | Sløkkiliðið (Rakstrarj.) | 7.913 | - |

## Handil og vinna annars

| | | | |
|---|---|---|---|
| **7.37.51.** | **Vinnumenning** | | |
| 110. | Vinnumenning (Rakstrarj.) | 3.315 | - |

## Samferðsla og samskifti

| | | | |
|---|---|---|---|
| **7.38.14.** | **Havnir og lendingar** | | |
| 110. | Havnir og lendingar (Rakstrarj.) | -23.200 | - |
| 111. | Havnir og lendingar (Løguj.) | 23.200 | - |
| **7.38.21.** | **Bussleiðin** | | |
| 110. | Bussleiðin (Rakstrarj.) | 20.570 | - |
| **7.38.22.** | **Parkeringsskipanin** | | |
| 110. | Parkeringsskipanin (Rakstrarj.) | -500 | - |

# § 20 Inntøkur

## A. Yvirlit

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | -595.138 | 38.265 | 633.403 |
| **Íbúðarmál** | | **28.000** | **-** |
| 20.22.41 Stuðul til rentuútreiðslur | | 28.000 | - |
| . | | | |
| **Rentur** | | **10.265** | **1.500** |
| 20.50.11 Rentuútreiðslur | | 10.265 | |
| 20.50.21 Rentuinntøkur | | | 1.500 |
| **Skattir og avgjøld** | | **-** | **631.903** |
| 20.52.11 Kommunuskattur | | - | 593.903 |
| . | | | |
| 20.52.12 Felagsskattur | | - | 35.000 |
| . | | | |
| 20.52.13 Skattur av eftirløn | | - | 3.000 |
| . | | | |

*Yvirlit yvir høvuðssløg:*

| | | | |
|---|---|---|---|
| Játtan tilsamans | | 38.265 | 633.403 |

| | | |
|---|---|---|
| Nettostýrt virksemi | - | - |
| Virksemi tilsamans | 38.265 | 633.403 |
| Flytingarútreiðslur | 10.265 | - |
| Skattir og flytingarinntøkur | - | 633.403 |
| Flytingar millum almennar myndugleikar | 28.000 | - |

# B. Játtanir

| | | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. kr. - | |
| | **Íbúðarmál** | | |
| **20.22.41.** | **Stuðul til rentuútreiðslur** | | |
| 110. | Stuðul til rentuútreiðslur | 28.000 | - |
| | **Rentur** | | |
| **20.50.11.** | **Rentuútreiðslur** | | |
| 110. | Rentuútreiðslur | 10.265 | - |
| 20.50.21 | Rentuinntøkur | | |
| 110 | Rentuinntøkur | | 1.500 |
| | **Skattir og avgjøld** | | |
| **20.52.11.** | **Kommunuskattur** | | |
| 110. | Kommunuskattur | - | 593.903 |
| **20.52.12.** | **Felagsskattur** | | |
| 110. | Felagsskattur | - | 35.000 |
| **20.52.13.** | **Skattur av eftirløn** | | |
| 110. | Skattur av eftirløn | - | 3.000 |

**Tilmælir til fíggjarnevndina.**

**Sosiala nevndin 20. oktober 2009:** Samtykt at taka undir við uppskotinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 21. oktober 2009:** Samtykt at taka undir við uppskoti-num og beina málið í fíggjarnevndina.

Eisini samtykt at biðja fíggjarnevndina útvega fíggjan til projektering av barnagarði í Hoyvík, til staðseting/fyrireiking av Musikkskúla og til hampan av kjallarahæddini í Reinsarínum av játtan á trivnaðarøkinum 2010.

**Byggi- og býarskipanarnevndin**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:

- at góðkenna uppskotið til fíggjarætlan fyri 2010, við uppskotum til broytingar sambært skjølunum nr. 2009-1377/2 - 2009-1377/8.

- at beina málið í aðrar sambært kontostronginum, kommunustýrisskipanini ella fyrisitingarliga bygnaðinum, viðkomandi faknevndir, at ummæla viðkomandi konti.

**Fíggjarligar avleiðingar**

| Útstykking á Dánjalstrøð | | Útreiðslur | Inntøkur | Netto |
|---|---|---|---|---|
| 6.22.11.110 Byggibúning bústaðir (løgujáttan) | tkr. | 3.500 | 3.500 | 0 |

**Byggi- og býarskipanarnevndin 19. oktober 2009:**
Ein meiriluti, Bogi Andreassen, Jógvan Arge og Halla Samuelsen samtyktu at taka undir við tilmælinum, herundir broytingar sambært skjølunum nr. 2009-1377/2 - 2009-1377/8, og at beina málið í fíggjarnevndina, um aðrar viðkomandi faknevndir at ummæla einstøku konturnar.

Ein minniluti Jan Christiansen tekur støðu á seinni fundi.

**Tekniska nevnd**
**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- at góðkenna uppskotið til fíggjarætlan fyri 2010, við uppskotum til broytingar sambært skjølunum nr. 2009-1377/13 - 2009-1377/19.

- at beina málið í aðrar sambært kontostronginum, kommunustýrisskipanini ella fyrisitingarliga bygnaðinum, viðkomandi faknevndir, at ummæla viðkomandi konti.

**Fíggjarligar avleiðingar**

| | Útreiðslur | Inntøkur | Netto |
|---|---|---|---|
| 6.30.21.111 Vatnveiting (løguætlan) | tkr. 650 | 0 | 650 |

**Tekniska nevnd, 22. oktober 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum, herundir broytingar sambært skjølunum nr. 2009-1377/13 – 2009-1377/19, og beina málið í fíggjarnevndina, um aðrar viðkomandi faknevndir, at ummæla einstøku konturnar.

**Brunanevndin 4. november 2009:** Samtykt at mæla fíggjarnevndini og býráðnum til at samtykkja fíggjarætlanina fyri verkstaðið og brandstøðina.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin**
**Tilmæli:**

Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á heilsu- og umhvørvisdeildini mæla til:

- at góðkenna uppskotið til fíggjarætlan fyri 2010, við uppskotum til broytingar sambært skjølunum nr. 2009-1377/20 - 2009-1377/21.

- at beina málið í aðrar sambært kontostronginum, kommunustýrisskipanini ella fyrisitingarliga bygnaðinum, viðkomandi faknevndir, at ummæla viðkomandi konti.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 3. november 2009:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Maria Hammer Olsen, Bogi Andreasen, og Levi Mørk, samtykti at taka undir við tilmælinum, herundir broytingar sambært skjølunum nr. 2009-1377/20 - 2009-1377/21, og at beina málið í fíggjarnevndina, um aðrar viðkomandi faknevndir, at ummæla einstøku konturnar.

Ein minniluti, Jan Christiansen, tekur støðu á seinni fundi.

**Ískoyti:**
Við at hækka íløgurnar í vatnveiting við tkr. 650 verður undirskotið tkr. 49.409, sum ætlanin er at fíggja við lántøku.

Kommunan hevur fingið uppgerð av partafelagsskattinum fyri 2008, sum er uppá 28 mió. kr. – 7 mió. kr. minni enn mett í endurskoðaðu fíggjarætlanini.

Mett verður ikki at partafelagsskatturin verður hægri fyri 2009.

Umsitingin mælir tí fíggjarnevndini til at lækka metingina av partafelagsskattinum í 2010 við 7 mió. kr. og at lækka útreiðslurnar samsvarandi.

**Fíggjarnevndin 9. november 2009:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Marin Katrina Frýdal og Jógvan Arge mælir býráðnum til at taka undir við sosialunevnd, teknisku nevnd, byggi- og býarskipanarnevndini, heilsu- og umhvørvisnevndini, mentamálanevndini og brunanevndini at samtykkja uppskotið til ársfíggjarætlan 2010.

Eisini samtykt at lækka metingina av partafelagsskattinum við 7 mió. kr., og at hækka metingina av persónsskattinum við 7. mió. kr.

Eisini samtykt, at seta kr. 2 mió. av á undirkotno 1010. Býráðsskrivstovan til ymisk tiltøk og átøk. Umsitingin kannar roknskaparligu og játtanarligu viðurskiftini.

Eisini samtykt at broyta tekstin til 4175, dagføring av skúlum.
” Í 2010 eru avsettar 8.5 mió. kr. íalt. Játtan verður samtykt til hvørja einstaka verkætlan”.

Eisini samtykt at hækka játtanina til 7510, bussleiðina við kr. 60.000 (j. nr. 2009-2587).

Ein minniluti, Sjúrður Olsen tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðið 12. november 2009:** Samtykt við fyrstu viðgerð við 8 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Kathrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk og Rúni Djurhuus.

Greiddu ikki atkvøðu: Anfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

Minnilutin boðaði frá, at hann tekur støðu seinni.

**Ískoyti:**
Fyri at sleppa undan misskiljingum viðv. síðutølum v.m. í sambandi við uppskot til broytingar, sum gjørdar eru í sambandi við nevndarviðgerðina av uppskotinum til fíggjarætlan fyri 2010, er í samráð við Roknskapardeildina avtalað, at allar broytingar samtyktar í byggi- og býarskipanarnevndini, teknisku nevnd og heilsu- og umhvørvisnevndini, verða savnaðar undir einum journalnr. – 2007-1377/13.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at broyta samtyktina í teknisku nevnd 22. okt. 2009, til at verða soljóðandi:
*skjølunum í j. nr. 2009-1377/13, og beina málið í fíggjarnevndina, um aðrar viðkomandi faknevndir, at ummæla einstøku konturnar.”*

**Tekniska nevnd 12. november 2009:** Ein meiriluti**,** Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen og Levi Mørk, samtykti at taka undir við tilmælinum. Ein minniluti, Sjúðrur Olsen, tekur støðu á seinni fundi. Jógvan Arge luttók ikki á fundinum.

**2. viðgerð**

**Ískoyti:**
Í sambandi við umlegging á Frítíðarskúlanum er neyðugt at hækka játtanina við 1.5 mió. kr.
Stjórnin mælir til at fíggja hetta soleiðis:

| | | |
|---|---|---|
| 4121 | Argja skúli lækkast | tkr. 500 |
| 2611 | Barnaverndarstova Føroya lækkast | tkr. 200 |
| 3215 | Barnaansing aðraar útreiðslur lækkast | tkr. 800 |
| Íalt | | tkr. 1.500 |

Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. november 2009:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Marin Katrina Frýdal, Elin Lindenskov og Jógvan Arge mælir við 2. viðgerð býráðnum til at góðkenna fíggjarætlanina við samtyktu broytingum.

Eisini samtykt at mæla býráðnum til at áseta skattaprosentið til 20,75 og barnafrá-dráttin til kr. 5.500.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, mælir býráðnum til at lækka raksturin við 30 mió. kr. og at skattaprosentið sostatt verður verandi 19,75.

**Býráðið 26. november 2009:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá minnilutanum um, at samtykkja fíggjarætlanina fyri 2010, tó við tí broyting, at raksturin verður lækkaður við 30 mio. kr. og at skattaprosenti komandi ár verður verandi 19,75%, ið fall við 4 atkvøðum fyri og 9 ímóti.

Fyri atkvøddu: Anfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Kathrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk og Rúni Djurhuus.

Síðan varð atkvøtt um meirilutatilmæli í fíggjarnevndini tann 18. november 2009, ið varð einmælt samtykt.

At enda varð atkvøtt um at áseta skattaprosenti til 20,75% og barnafrádráttin til 5.500, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Kathrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk og Rúni Djurhuus.

Greiddu ikki atkvøðu: Anfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

**239/09** **<u>2009-2725</u>**

**<u>Fíggjarætlanin 2010 hjá Tórshavnar havn</u>**

Sambært kommunustýrisskipanini skal fíggjarnevndin fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri kommunustýrið til komandi fíggjarætlan.

Kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi

14 daga millumbili.

Fíggjarætlanin skal verða endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.

Áðrenn fíggjarnevndin framleggur uppskot til fíggjarætlan, leggur fíggjarnevndin uppskot til fíggjarkarmar fyri býráðið til nevndirnar at leggja fíggjarætlan eftir.

**Havnarnevndin 26. oktober 2009:** Samtyktu fíggjarætlanina við 1. viðgerð, sum javnvigar við tkr. 47.365, og at senda hana til fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 9. november 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnarnevndini og at hækka íløguna á konto 7410 við kr. 500.000 til kr. 23.700.000.

**Býráðið 12. november 2009:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

**2. viðgerð**

**Havnarnevndin 16. november 2009:** Samtyktu fíggjarætlanina við 2. viðgerð, sum javnvigar við tkr. 47.365,-, og at senda hana til býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. november 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at samtykkja uppskotið við 2. viðgerð.

**Býráðið 26. november 2009:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

- Nú fór Jan Christiansen

**240/09** **2007-3310 (sí j.nr. 2008-1295/9)**

**Gerð av fyribils gongubreyt á Glyvursvegi – frá útstykkingini á Hamri til Fíggjarmálaráðið.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Eigarafelagið á Hamrinum á Argjum hevur havt samskifti við umsitingina hjá kommununi. Trupulleikin hjá íbúgvum á Hamrinum er, at tey óttast teirri alsamt vaksandi ferðsluni til og frá útstykkingini. Tey gera vart við at nógv børn ganga á sterkkinum til skúlan, ið er í posthúsbygninginum vbið fíggjarmálaráðið.

Ein háttur fyri at fáa bøtt eitt sindur um trygdina er at gera eina fyribils gongubreyt eftir verandi Glyvursvegi niðara borði. Tá nýggi Glyvursvegur verður liðugur, eru hesi atkomuviðurskifti hjá skúlabørnum loyst. Eftir sum eigaraviðurskiftini ikki eru loyst enn, er neyðugt hjá kommununi at fáa loyvi frá avvarðandi eigarum um at fara undir arbeiðið. Glyvursvegurin liggur á hesum matriklum smb. FDS-skipanini:

Matr. nr. 56 ad, Argir: Eigari: Føroya Landstýri
Matr. nr. 56a, Argir, Eigari:Argja kommuna
Matr. nr. 4a, Argir, Eigari: Føroya Landstýri
Matr. nr. 4gp, Argir: Eigari: Tórshavnar kommuna

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Leystliga mett kr. 225.000,- íroknað asfaltering av gøtu uml. 1 m og striking uml. 725 m av gongubreyt.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at fara undir arbeiðið, og at hetta verður fíggjað av kto. 16.

**Tekniska nevnd 8. november 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

- Umsitingin kunnar um málið.

**Tekniska nevnd 16. juni 2009:** Kunnað var um málið.

**Ískoyti:**
Í sambandi við vegarbeiðið av Glyvursvegi 5. og 6 stigi, hevur festarin av matr. nr. 4a, Argir (Kirkjubøhagi fyri Handan), gjørt vart við ymisk viðurskifti, sum hann ikki er nøgdur við. Størsti trupulleikin fyri hansara búnaðarhaldi er, at hann ikki veit hvussu kommunan ætlar at víðka um sítt virksemi, tvs. hvørji øki verða løgd av til vegagerð, skúlar og barnagarðar.

Hann hevur í sambandi við fundarvirksemið við umsitingina m.a. víst á, at fyribils gøtan, ið var løgd í sambandi við vegagerðina, skal takast burtur. Festarin hevur eisini boðað frá, at hann als ikki kann góðtaka, at kommuan møguliga fer at ogna sær lendi. Harumframt vísir hann á, at hegn skal setast fram við vegøkslini á nýggja Glyvursvegnum og víst á ymsar manglar ísv. matrikulloysnirnar, tá ið farið er undir bygging av barnagarði, skúla og vegum, tí eigaraviðurskiftini eru ikki fingin í rættlag.

Áðrenn avgerð verður tikin um at taka gøtuna upp aftur, er ynski, at tekniska nevndin tekur støðu um so skal verða ella ikki. Tað fyriliggja ikki metingar um kostnað fyri upptøku av gøtuni og heldur ikki fyri hvat tað kostar at reetablera lendið aftur.

Málið hevur verið vigjørt í byggginevndini fyri Glyvursveg 5. og 6. stig. Og var niðurstøðan at lata gøtuna vera har hon er. Nevndin tekur ikki støðu til spurningin um umfangið av øki av undirhaganum, ið kommunan møguliga skal ogna sær. (sí j. nr 2007-1283/15).

Tekniska nevndin skal taka støðu til, um kommunan skal onga sær lendi til gøtuna.

Umsitingin greiðir frá ymsum uppskotum um keyp av lendi á økinum kring Glyvursvegin og útstykkingina á Hamrinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við bygginevndini.

**Tekniska nevnd 12. november 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og mælir til at kommunan ognar sær neyðuga lendið og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. november 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við at ogna sær uml. 1.500 m² á 110,7 kr/m² og at fíggja keypið av vegaprojektinum.

Eisini samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við møguleikanum at kommunan ognar sær ein størri part av økinum.

**Býráðið 26. november 2009:** Einmælt samtykt.

- Nú kom Jan Christiansen,

**241/09** **<u>2009-2836</u>**

**<u>Eik-garðurin liðugtgerð av spæliøki á matr. nr. 383 N.Finsensgøta</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Málið byrjar miðjan mai 2009 har, sum politiska leiðslan ger avtalu við Eik-banka at gera ábøtur á urtagarðin hjá bankadeildini í Niels Finsensgøtu. Talan er um gamla urtagarðin hjá fyrr Sparikassanum. Her standa stór trø, sum eru týdningarmikil fyri býarmyndina.

Avgjørt varð at býarskipanardeildin gjørdi uppskot, sum varð lagt fyri Eik-leiðsluna at góðtaka. Síðani varð arbeiðið sett í gongd fyrst í juli 2009, og skuldi verða liðugt til Ólavsøku. Nakað av iva var um hvør skuldi gjalda, men politiska

leiðslan greiddi hetta við einari avtalu við Eik, soleiðis at bankans partur varð 267. 800 kr, ið er goldin. Sí mál nr. 2009-1813.

Arbeiðið varð ikki endaliga liðugt til Ólavsøku og skuldi restin gerast aftaná. Tilboð eru innkomin um at gera restina áljóðandi 330.000 kr. Íroknað mgv.

Borgarstjórin hevur biðið um at fáa málið á skrá, við umbøn um, at byggi- og býarskipanarnevndin ger umraðfestingar av íløgukarminum til fríðkan av býnum fyri 2009, og har at flyta pening til at gera arbeiðið liðugt, og at játta nevndu peningaupphædd á kr 330.000, av konto 90-1038-33007, Niels Finsensgøta. Sí eisini mál nr. 2007-3648 og 2005-1122.

Saldo á hesi konto er pr. 2. nov. 2009, 455.000 kr. Mett verður ikki, at nakað stórvegis arbeiði verður sett í gongd í gongugøtuni í verandi fíggjarári. Tó vísir tekniski stjórin á, at fíggjartørvurin til liðugtgerð av N. Finsensgøtu er mettur til uml. 900.000, harav helvtin bleiv játtað av fíggjarkarminum fyri 2009, og hin helvtin skuldi eftir ætlan játtast í sambandi við raðfestingarnar av játtanini til fríðkan av býnum fyri 2010.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 9. november 2009:** Nevndin samtykti at mæla býráðnum til, um fíggjarnevndina, at umraðfesta íløgukarmin við at játta kr 330.000, av konto 90-1038-33007, Niels Finsensgøta til arbeiðið í Eik garðinum.

**Fíggjarnevndin 18. november 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 26. november 2009:** Einmælt samtykt.

**242/09** **<u>2009-0427</u>**

**<u>Status - Uppgerð fyri liðug arbeiði, sum eru fíggjað av íløgum 2009</u>**

**Lýsing av málinum, samandráttur.**
Umsitingin leggur fram yvirlit yvir status á teimum ymsu verkætlanum innan tekniska økið. Talan er um anlegsarbeiði innan:

1. Kloakkir
2. Vegir
3. Vatn
4. Renovatión
5. Fíðkan av býnum
6. Kirkjugarðar
7. Aðrar verkætlanir

Ætlanin er framyvir at fáa staðfest figgjarliga status í íløguarbeiðum, og tí skal tekniska nevndin, um fíggjarnevnd og býráðið, staðfesta framløgdu uppgerð innan kloakkarbeiði. (víst verður til niðurstøðuna í máli nr. 2007-0649 Kloakk í Skraddaragøtu).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:
at loka lidnu kloakkverkætlaninar sambært yvirliti j. nr. 2009-0427
at flyta nettoavlopið av lidnu kloakkverkætlanum á kr. 1.719.577,- til kloakkverkætlanir í 2009.

**Tekniska nevnd 12. november 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. november 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd

**Býráðið 26. november 2009:** Einmælt samtykt.

**243/09** **2009-1547 - GHM (sí eisini mál nr 2008-3152)**

**Parkeringsviðurskifti í miðbýnum**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í framhaldi av viðgerðini av málinum um bilfríðan miðbý á forfundi í býráðnum, sí j.nr. 2008-3152, verður í hesum málinum settur skjøtil á fyriliggjandi uppskot frá Rambøll um parkeringspolitikk tvs. parkeringsviðurskifti í miðbýnum burturav. Fyri at kunna viðgera málið ítøkilga og eftirfylgjandi koma við tilmæli er neyðugt at kanna teknisku viðurskiftini, ið eru knýtt t.d. at eini gjaldsskipan, sum ætlan er at fara undir at gera.

Harumframt er umráðandi at kanna fíggjarligu viðurskiftini við eini slíkari skipan sum t.d. innan útvegan av skipanini og rakstur. Í verandi parkeringsskipan eru parkeringsansararnir undir dagligari leiðslu av ferðslumyndugleikanum. Tórshavnar kommuna stendur fyri fíggjarliga rakstrinum av skipanini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at
1. umsitingin letur gera uppskot til parkeringspolitik fyri kommununa
2. uppskot til skipan við tíðaravmarkingum og gjaldsparkering verður gjørt at leggja fyri nevndina aftur, við grundarlagið í “Parkeringsanalyse i Tórshavn Midtby” frá 1. apríl 2009 og “Parkeringspolitik for Tórshavn Midtby” frá 12. mai 2009

3. gjørd verður kostnaðarmeting av íløgum í samband við pkt. 2, og meting av inntøkum við slíkari skipan
4. játtaðar verða kr. 250.000 til kanningar- og fyrireikingararbeiði

**Tekniska nevnd 16. juni 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at mæla fíggjarnevndini til at játta pening til kanningararbeiðið.

**Fíggjarnevndin 25. juni 2009:** Samtykt at játta kr. 250.000,- til kanningar- og fyrireikingararbeiðið av reguleringskontoini, at leggja fram í seinasta lagi 1. november 2009.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur fingið kostnaðarmeting frá Rambøll & Nyvig uppá at gera uppskot til parkeringspolitikk. Umsitingin hevur gjørt viðmerkingar til uppleggið, og hevur havt fund við Rambøll & Nyvig um hetta hin 12. nov. 2009.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at nevndin tekur undir við upplegginum til parkeringspolitik við teimum viðmerkingum umsitingin hevur gjørt, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina til góðkenningar.

**Tekniska nevnd 12. november 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við upplegginum til parkeringspolitikk frá Rambøll, dagfest 16/10-2009, við teimum viðmerkingum umsitingin hevur gjørt og at beina málið í býráðið um fíggjar-nevndina.

**Ískoyti:**
Rambøll & Nyvig hevur tillaga "Oplæg til P-politik", soleiðis at skrivligu viðmerkingarnar frá umsitingini og viðmerkingarnar á fundi við Rambøll & Nyvig hin 12. nov. 2009, nú eru innsettar í tekstin.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at nevndin tekur undir við tillagaða "Oplæg til P-politik", frá Rambøll & Nyvig, dagfest 16.11.2009, rev. 1, og at beina málið í býráðið til góðkenningar.

**Fíggjarnevndin 18. november 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 26. november 2009:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Kathrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Rúni Djurhuus, Annfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen og Sjúrður Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Jan Christiansen.

**244/09** **2008-4150**

**Liðugtgerð av útfylta havnaøkinum á Langasandi í Kollafirði.**

**Lýsing og samandráttur av málinum:**
Økið á Langasandi í Kollafirði, tað er har sum bygningurin hjá Atlanticpane stendur, bleiv útfylt áðrenn kommunu samanleggingina.

Av tí at ongi vinnustykkir eru í Kollafirði, hava fleiri smáar fyritøkur goymt ymiska útgerð á økinum. Hetta hevur ofta givið trupulleikar, og gevur enn ávísar trupulleikar, tí økið av tí sama kemur at síggja óruddiligt út.

Hóast økið ikki er ætlað til móttøku av avgrevstri og øðrum tilfari, kemur tað meira enn so fyri, at hetta verður vippað á økið og fram við sjóvarmálanum, uttan at nakar hevur givið loyvi til hettar. Hettar hevur viðført, at serliga sjóvarmálin kundi verið vakrari.
Ein máti at fríðka um økið er at laga grót fram við sjóvarmálanum. Hetta hevði gjørt, at økið bleiv nógv vakrari, og eitt týðuligt signal um, at onki skal vippast á sjógv.

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til at bjóða arbeiði út, at taka av lægsta tilboðnum, og at seta arbeiðið í verk.

**Havnarnevndin 29. september 2008:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og at beina málið í kollfjarðarnevndina.

**Kollfjarðarnevndin 11. desember 2008:** Nevndin viðmælir ætlanini.

-Arbeiðið at laga grót fram við sjóvarmálanum, at hampa um økið og at taka gamla frýstihúsið á matr. 237 niður, hevur verið boðið út.

Articon hevur lægsta tilboðið upp á kr. 487.897,-

**Tilmæli frá havnarmeistaranum**: Mælt verður til at taka av tilboðnum frá Articon, og at játta 500 tkr til arbeiðið, at fíggja av íløgum hjá Tórshavnar havn.

**Havnarnevndin 16. november 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. november 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnarnevndini.

**Býráðið 26. november 2009:** Eimælt samtykt.

245/09 **2009-2930**

**Keyp av flótibrúgv.**

**Lýsing og samandráttur av málinum:**
Tey flestu ferðafólkaskipini, sum vitja okkum um summarið, koma til bryggju. Tey skipini, sum ikki koma til bryggju liggja á redini, og sigla fólk í land við smærri bátum. Bátarnir leggja tá til træbryggjuna á Bursatanga.

Tað kemur tó meira enn so fyri, at fleiri enn eitt skip liggja á redini samstundis, og kann tað tá blíva heldur trongligt við træbryggjuna. Eisini kemur tað fyri, at skip eru á Havnini á ólavsøku, tá tað ikki er møguligt at koma inn um molan millum kl. 14 og 18.

Tað er møguligt at hava meiri enn eitt skip á redini samstundis, og at hava skp á ólavsøku, um vit keypa eina flotbrúgv. Um tað eru fleiri enn eitt skip samstundis, kunnu vit leggja flotbrúnna á uttaru síðu av Bursatanga, og á ólavsøku kunnu vit leggja hana til Skansabryggjuna.

Umframt at brúka brúnna til ferðafólkaskip, kann hon eisini brúkast til onnur hóskandi endamál.

Møguligt er at keypa eina 24- x 5 m stóra flotbrúgv fyri 400 tkr.

**Tilmæli frá havnarmeistaranum:** Mælt verðut til at játta kr. 400 tkr. av íløgum hjá Tórshavnar havn til keyp av flotbrúgv.

**Havnarnevndin 16. november 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. november 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnarnevndina.

**Býráðið 26. november 2009:** Einmælt samtykt.

- Nú fóru Levi Mørk, Annfinn Brekkstein og Halla Samuelsen.

**246/09** **2009-0479**

**Sankta Frants - nýbygging av smábarnaskúla**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Katólska kirkjan, fransiskanarsystrarnar, fóru undir at byggja kirkju, kleystur, skúla og barnagarð í 1932. H.C.W. Tórgarð, arkitektur gjørdi tekningarnar, og skúlin varð vígdur í 1933.

Í 1953 varð skúlin útbygdur, bæði við fimleikahøll og fleiri skúlastovum, í seksti- og sjeytiárunum varð skúlin aftur víðkaður.

Bygningurin er bygdur sum timburbygningur frá 1 hædd til 3 hæddir. Ein partur hevur kjallara.

Skúlin er ein tveysporaður skúli og hevur í dag 350 næmingar, og 40 starvsfólk arbeiða á skúlanum.

**Grundøki:**
Matr. nr. 779 f, stødd 4846 fermetrar.
Verandi ábygging 1246,00 fermetrar ábygging 0,26
Verandi nýtsluøki 3300,85 fermetrar nettonýtslustig 0,68

Sambært ásetingum fyri A1 og D3 grundumráði, ið skúlin liggur í, má byggistigið ikki fara upp um 0,3, og nettonýtslustig ikki fara upp um 0,3.

**Verandi støða**
Bygningurin hevur stórar trupulleikar við plásstroti, brunatrygd og arbeiðs-umhvørvi.

**Útbyggja skúlan**
Í norðara skúlagarði verða bygdar 4 skúlastovur við tilhoyrandi felagsrúmum, 407 m². Bygningurin verður í einari hædd.

Við tað at økið verður tikið frá verandi skúlagarði, má víðkast um skúlagarðin við øki frá Fransiskanarsystrunum.

Kostnaðarmeting 407 m² x 16.000= kr. 6.512.000,00 uttan MVG. Útbyggingin av skúlanum nøktar tørvin fyri skúlastovum til smærru flokkarnar, og byggjast kann uttan at órógva skúlagongdina munandi.

Neyðugt verður við undantaksloyvi fyri nettonýtslustigið og góðkenning frá granna, Skógrøkt landsins.

**Verandi skúlabygningur**:
Tað verður neyðugt at brunatryggja verandi bygning, og at dagføra VVS, el-skipanina og ventilatiónskipanina.

Hesi arbeiði kunnu gerast stigvís. Rúmsháttari verður í gamla skúlanum, um yngru næmingarnir flyta í nýggja skúlan.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og deildarleiðarin í mentamálum mæla til at skúlin verður útbygdur við 4 skúlastovum, og at málið verður beint í byggi- og býarskipanar-nevndina, har søkt verður um loyvi at byggja í norðara skúlagarði.

**Mentamálanevndin 26. februar 2003:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og deildarleiðaranum.

Eisini samtykt at kanna møguleikan at ogna/leiga økið eystanfyri, norðanfyri og vestanfyri nýbygningin, og at leggja málið fyri aftur mentamálanevndina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir frá yvirhøvur at útbyggja Sankta Frans skúla vísandi til:

**at** alt ov nógv er bygt á økið sum er.
**at** ferðsluviðurskiftini í økinum eru út av lagi vánalig.
**at** nýggi smábarnaskúlin kemur alt ov tætt at kirkjuøkið og alt ov tætt at skóg-friðaðum øki.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 24. mars 2003:** Málið varð framlagt, umsitingin arbeiðir víðari við málinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur arbeitt víðari sambært samtyktini frá BB 24. mars 2003.

Umsitingin hevur gjørt eitt uppskot til verkætlan, har ein nýbygningur verður bygdur á sjálstøðugari matr., sum verður fingin til vega eftir fylgjandi leisti:

Sambært fyribils kanningum, skal býtið av matr. skipast eftir hesum leisti.

| | |
|---|---|
| Matr.nr 779a skal lata | 890 m² |
| Matr.nr.779b skal lata | 20 m² |
| Samlað gevur hetta: | 1710 m² |

Umrøddu matriklar liggja í D3, har ásetingarnar um bygging eru:

Byggistig: 0,25

Nettonýtslustig: 0,30

Roknað verður við nýbygging uppá uml. 400 m².

Sambært hesum uppskoti er hædd tikin fyri, at skúlabygningurin er fluttur niðan á matr. nr. 779b, soleiðis at hann ikki liggur so tætt upp at kirkjuni.

Kirkjan er ein sera vakur bygningur og eigur at sleppa at standa so eksponeraður sum til ber.

Henda ætlan innber, at matr. nr. 779b søkir um at fáa sundurbýtt ognina har latið verður uml. 820 m² til ætlanina saman við ein part 890 m² frá matr.nr. 779a.

Hesir báðir partarnir skulu leggjast saman til ein sjálvstøðuðan matrikul uppá uml. 1710 m² við atkomurætt yvir matr.nr. 779f upp á 4 m breiðan vegaskap. Tekning j. nr. 200101587-21.

Skeyti upp á matr. eru fingin til vega og vera kannað fyri servituttir o.a. Eftir er eisini at kanna skógfriðingarmyndugleikar og aðrar avvarðandi myndugleikar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin samtykkir at taka undir við nýggju verkætlanina, so arbeiðast kann víðari við málinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 23. juni 2003:** Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býararkitektinum.

**Ískoyti:**
22. mars 2005:

Umsókn, dagfest 4. februar 2004, var send náttúrufriðingarnevndini um at byggja skúla samb. hjáløgdu tekning, sí j. nr. 200101587-35.

Náttúrufriðingarnevndin avgjørdi ikki at viðmæla umsóknini, sí j. nr. 200101587-34.

Nýggj umsókn, dagfest 24. juli 2003, var send náttúrufriðingarnevndini um at byggja skúla samb. hjáløgdu tekning, sí j. nr. 200101587-39.

Yvirfriðingarnevndin viðmælti umsóknini, sí j. nr. 200101587-48.

Verður skúlin á uml. 430 m² bygdur í skúlagarðinum, har skýlini eru, sí kort 1, skulu uml. 420 m² frábýtast matr. nr. 779a, sí kort 2.

Ætlanin er at frábýta 810 m² frá 779a og 700m² frá 779b til grønt spæliøki, sí kort 2.

Umrøddu matriklar liggja í D3, har ásetingarnar um bygging eru:
Byggistig : 0,25
Nettonýtslustig: 0,30

**Grundøki:**
Matr. nr. 779f, stødd 4846 fermetrar.
Verandi ábygging 1246,00 fermetrar ábygging 0,26
Verandi nýtsluøki 3300,85 fermetrar nettonýtslustig 0,68

Um 1930 m² verða lagdir afturat 779f verður byggistigið: 1676 : 6776 = 0,25. Nettonýtslustigið verður: 3730,85 : 6776 = 0,55.

Núverandi vídd á matr. nr. 779a er 4035 m. Frábýtast skulu 1230 m², soleiðis at samlaða víddin verður 2805 m². Á matr.nr. 779a stendur bygningur sum er bústaður hjá franciskanarasystrunum, 315 m² til víddar, umframt katólska kirkjan, sum er 176 m² til víddar.

Núverandi vídd á matr. nr. 779b er 3024 m². Frábýtast skulu 700 m², soleiðis at samlaða víddirn verður 2324 m². Á matr. nr. 779a standa eini sethús 110 m² til víddar, umframt ein partur av katólsku kirkjuni.

Viðmerkjast skal, at katólska kirkjan stendur á bæði matr. nr. 779a og matr. nr. 779b, og at tað var ein treyt frá kommununi, at markið var broytt, soleiðis at kirkjan kom at standa á einum matr. nr. Henda broyting er ongantíð gjørd.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir nevndini til at viðmæla, at Tórshavnar kommuna fer undir at keypa nevndu fermetrar og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. apríl 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur við atliti til undanfarna samtykt í byggi- og býarskipanarnevndini 4. apríl 2005 mett, at neyðugt er at senda málið til grannahoyringar vísandi til, at orsøkin fyri, at kommunan fer undir at keypa lendið, er at kommunan umhugsar at byggja meira á økinum, og at ein slík bygging vil krevja frávik frá ásetingunum um nettonýtslustig fyri økið.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir nevndini til at senda málið til grannahoyringar fyri at hoyra grannarnar um ætlaninar um bygging, sum treytar frávik til krøvini um nettonýtslustig fyri økið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2005:** Nevndin samtykti at senda málið til grannahoyring.

**Fíggjarnevndin 13. apríl 2005:** Samtykt at taka undir við samtyktini frá byggi- og býarskipanarnevndini 4. apríl 2005.

**Ískoyti:**
Málið hevur verið til grannahoyringar, viðmerkingarnar verða viðgjørdar á fundinum.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at nevndin góðkennir ætlanina, so at arbeiðast kann víðari við málinum.

Meðan málið varð viðgjørt, var Magni ikki á fundi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. juni 2005:** Nevndin samtykti at góðkenna ætlanina, og at atlit verða tikin til viðmerkingarnar frá grannum um at útvega fleiri bilstøðlar á skúlaøkinum.

**Ískoyti:**
**Nýggjur smábarnaskúli við Sankta Frans skúla**.
Ætlanin er at byggja nýggjan skúla til forskúla, 1. flokk og frítíðarskúla til forskúla.

Nýggi bygningurin verður skipaður sum ein sjálvstøðugur bygningur, sum verður bygdur leysur av gamla skúlanum.

Fyri at keypa lendið er neyðugt at gera eitt skitsuuppskot.
Biðið verður um kr. 500.000,00 til liðugtgerð av byggiskrá og skitsuprojekt. Av serligum orsøkum er byggiskráin ikki gjørd liðug.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta peningin kr. 500.000,00 av íløguætlanini á skúlaøkinum til at gera byggiskrá og skitsuuppskot.

**Mentamálanevndin 30. november 2005:** Samtykt at játta kr. 350.000,00 av íløguætlanini á skúlaøkinum til at gera byggiskrá og skitsuuppskot og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2005:** Samtykt at beina málið aftur í mentamálanevndina at fáa greiðu á, hvat byggiskrá og skitsuprojekt skal gerast fyri, vísandi til samtykt 26. februar 2003 um 4 skúlastovur og tilmæli um nýggjan skúla til forskúla, 1. flokk og frítíðarskúla til forskúlan.

**Ískoyti:**
Byggi- og býarskipanarnevndin samtykti tann 13. juni 2005, at atlit skulu verða tikin til viðmerkingarnar frá grannum um at útvega fleiri bilstøðlar á skúlaøkinum

enn teir 9 bilstøðlarnar, sum er minstakrav til bilstøðlar sambært byggisamtyktini til ein bygning á 430 m².

Umsitingin hevur arbeitt víðari við arbeiðsskrá og skitsuuppskoti av nýbygningi. Við atliti til samtyktina 13. juni 2005 metir arbeiðsbólkurin og býararkitekturin tað verða sera torført at liva upp til nevndu samtykt.

Sambært byggisamtyktini skal áður nevndi nýbygningur útvega 9 bilstøðlar, hesum kann takast hædd fyri við at taka av verandi skúlagarði, men tað kann ikki metast ráðiligt at taka meira enn hetta av skúlagarðinum, vísandi til at umstøðurnar frammanundan eru trongar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. desember 2005:** Nevndin samtykti at arbeiðast skal víðari við málinum við 9 bilstøðlum.

**Fíggjarnevndin 15. desember 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 15. desember 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Byggiskrá og dispositiónsuppskot verða framløgd.

**Mentamálanevndin 8. mars 2006:** Málið varð umrøtt og verður viðgjørt aftur á einum seinni fundi í mentamálanevndini.

**Brot úr byggiskránni:**
“Tórshavnar kommuna setti í november 2005 eina bygginevnd at fyrireika nýggjan barnaskúla við Skt. Frans skúla. Nevndin er mannað av:

| | |
|---|---|
| Unnie Justinussen | Tórshavnar kommuna/tekniska fyrisiting |
| Høgni Joensen | Tórshavnar kommuna/trivnaðarfyrisitingin |
| Selmar Jacobsen | Skúlastjóri/Skt. Frans skúli |

Skrivari hjá nevndini er Rúni Abrahamsen MAP Arkitektar.

Tað hava verið gjørdar fleiri ætlanir at útbyggja Skt. Frans skúla, men lítið annað er hent enn onkrar hissini umvælingar.

Ein av orsøkunum at einki enn er hent, kann vera, at einki byggilendi er til skúlan. Onkur ætlan hevur verið at byggja niðaneftir móti viðalund og kleystrinum, men hesar eru steðgaðar av náturufriðingarnevnd og skógrøkt landsins. Fransiskanararsystrarnar eiga eisini økið aftan yri skúrarnar við fimleikahøllirnar.

Kommunan hevur sent umsóknir til náttúrufriðingarnevndina, sum til síðst góðkendi eitt uppskot uppá 430 fermetrar í einari hædd, bygt har skúrarnir standa

í dag. Náttúrufriðingarnevndin skal somuleiðis hava uppskotið til bygging til góðkenningar.

Hetta hevur verið útgangsstøðið hjá bygginevndini.”

**Tilmæli:**
Mentamálaleiðarin mælir til, at bygginevndin arbeiðir víðari við byggiskránni, har kostnaðurin verður kr. 20.000,00 m² við MVG og innbúgv.

Skúlastýrið í Sankta Frans skúla hevur biðið um fund við mentamálanevndina um ætlanirnar hjá nevndini um byggjan av nýggjum smábarnaskúla til forskúla og 1. flokk.

**Mentamálanevndin 28. mars 2006:** Mentamálanevndin møtti á fundi í Sankta Frans skúla, har nevndin hevði fund saman við skúlastýrinum.

Samtykt at viðgera málið aftur á næsta fundi í mentamálanevndini, sum verður týsdagin 4. apríl 2006.

**Mentamálanevndin 4. apríl 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentamálaleiðaranum at byggja skúlabygning fyri kr. 20.000,00 m² við MVG og innbúgvi, tilsamans kr. 9 mió.

Nevndin samtykti eisini at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at bjóða arbeiðið út í umvendari licitatión og at fíggja arbeiðið av íløgum.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 27. apríl 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu at taka undir við fíggjarnevndini og samtykt at bjóða arbeiðið út beinanvegin.

**Tilmæli frá bygginevndini og býararkitektinum:**
**Lýsing av málinum**
Tórshavnar kommuna setti í november 2005 eina bygginevnd at fyrireika nýggjan barnaskúla við Sankta Frans skúla.

Nevndin kom við byggiskrá og uppskoti í mars 2006. Byggiskrá og uppskot var lagt fyri mentamálanevndina til støðutakan. Nevndin gjørdi somuleiðis vart við, at byggingin var viðbrekin, tí partur av grundøkinum er ogn hjá fransiskanarsystrunum, sum skuldu góðkenna uppskotið. Tí var uppskotið kanska dýrari enn líknandi bygging aðrastaðni. Somuleiðis hevur umhvørvið, skúlin og lendi ein dýrkandi leiklut.

Mentamálanevndin avgjørdi á fundi 4. apríl 2006 at senda verkætlanina út í øvutari lisitatión.

Støðan á arbeiðsmarknaðinum er í løtuni ikki til fyrimunar fyri hesum útbjóðingarhátti. Arbeiðstakarar hava ovmikið at gera. Hetta sæst ikki einans á teimum lisitatiónum, sum hava verið í seinastuni, men eisini tá ið arbeiðstakarar ítøkiliga verða spurdir, um áhugi er at bjóða upp á arbeiði eftir hesum leisti.

Av tí at arbeiðstakarar í Tórshavn ikki hava avvíst at bjóða upp á arbeiðið, men hava víst á, at hátturin er arbeiðskrevjandi, mælir bygginevndin og býararkitekturin til at broyta útbjóðingarháttin til høvuðsarbeiðstøku eftir prekvalifikatión, har tekniska umsitingin hevur møguleika at meta um hvønn einstakan arbeiðstakara við atliti at førleika, manning og fíggjarligum viðurskiftum.

Undanførleikametingin gevur grundarlag at bjóða arbeiðið út millum skikkaðar arbeiðstakarar antin í lisitatión, í undirhondsboði ella við samráðing alt eftir, hvussu nógvir arbeiðstakarar uppfylla minstukrøvini.

Ætlanin við undanførleikametingini er at staðfesta ítøkiligt, um áhugin hjá arbeiðstakaranum at bjóða er sakliga undirbygdur.

Til undanførleikametingina kann verða biðið um hesar upplýsingar:

1. Almenn lýsing av arbeiðstakaranum, so metast kann um kravda minstuorku bæði á tí fíggjarliga og á tí tekniska økinum.
2. Upplýsingar um fyriskipan og bygnaðin hjá fyritøkuni, undir hesum møguligt samband við móðurfelag.
3. Váttan ella trúnaðarváttan, at arbeiðstakarin ikki hevur ógoldnað skuld til tað almenna, ið er fallin til gjaldingar.
4. Avrit av viðkomandi vinnulívstryggingum.
5. Upplýsingar um eginogn og javna í roknskapi, tá ið søkt verður saman við einari váttan av samlaðu søluni hjá fyritøkuni síðstu trý roknskaparárini.
6. Váttan um árliga miðaltalið av fólki, sum starvast í fyritøkuni.
7. Ummæli frá líknandi uppgávum.
8. Lívsgongdarlýsing (CV) hjá lyklafólkunum, ið verða knýtt at uppgávuni.
9. Upplýsingar um góðsku-, trygdar- og umhvørvisskipanir hjá fyritøkuni.

**Tilmæli frá trivnaðarstjóranum og mentamálaleiðaranum:**
Mælt verður til at taka undir við tilráðingini frá bygginevndini og býararkitektinum.

**Mentamálanevndin 1. november 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og mentamálaleiðaranum og at beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 8. november 2006:** Samtykt at bjóða arbeiðið út í høvuðsentreprisu beinanvegin.

**Býráðið 16. november 2006:** Fyrst varð atkvøtt um tilmælið frá Hilduri Eyðunsdóttir um at taka undir við mentamálanevndini tann 1. november 2006, ið fall við 1 atkvøðu fyri og 8 ímóti.
Fyri atkvøddi: Hildur Eyðunsdóttir

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Leivur Hansen, Annika Olsen, Inga Dahl, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Greiddu ikki atkvøðu: Jógvan Arge, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov

Síðan varð atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

**Uppískoyti:**
Endalig góðkenning frá Náttúrufriðingarmyndugleikunum er ikki enn komin upp á pláss, men fyri at arbeiðið ikki skal draga út meira enn neyðugt, verður mælt til at projekteringin heldur áfram.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 1,5 mill. til projektering av útbjóðingartilfari til Sankta Frans skúla av íløgum fyri 2008.

**Mentamálanevndin 18. februar 2008:** Nevndin samtykti at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og mentamálaleiðaranum.

**Fíggjarnevndin 20. februar 2008:** Ein meiriluti, Jógvan Arge, Elin Lindenskov og Jan Christiansen mælir býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini, tó so at peningurin ikki verður brúktur fyrr enn góðkenning frá náttúrufriðingarmyndugleikunum fyriliggur.

Ein minniluti, Leivur Hansen og Høgni Mikkelsen mælir býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 28. februar 2008:** Atkvøtt um meirilutatilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri og 4 ímóti.

Fyri atkvøddu: Jógvan Arge, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Kathrina Frýdal, Elin Lindenskov, Halla Samuelsen, Sjúrður Olsen, Jan Christiansen og Inga Dahl.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Leivur Hansen, Bjarti Mohr og Beate L. Samuelsen

Greiddi ikki atkvøðu: Annfinn Brekkstein

**Ískoyti:**

Fyri at byggja smábarnaskúlan hjá Sankta Frans skúla var neyðugt at keypa lendið, sum var partur av matr.nr. 779a og matr.nr. 779b til skúlan. Kostnaðurin fyri keypið er kr. 288.561,67.

Samráðingar hava verið við eigaran av lendinum, sum hevur játtað at selja kommununi uml. 1.394 fermetrar av matr. nr. 779a, og uml. 705 fermetrar av matr. nr. 779b (tilsamans uml. 2.099 fermetrar). Eisini eru øll neyðug loyvi frá friðingarmyndugleikunum og skógfriðingarnevndini fingin til vega. Prísurin, sum kommunan kann ogna sær lendi fyri liggur langt undir vanligan marknaðarprís.

Víst verður til fíggjarnevndarsamtykt 13. apríl 2005, sum tekur undir við samtyktini frá byggi- og býarskipanarnevndini frá 4. apríl 2005 at fara undir at keypa økið matr.nr.779a og matr.nr.779b.

Gongdin í málinum hevur verið drúgv, m.a., tí at neyðugt var at fáa góðkenning frá friðingarmyndugleikunum til bygging á økinum, áðrenn lendið varð keypt. Haraftrat er tíð farin til frámatrikulering og samanlegging av ognum býráðsins til byggilendið.

Biðið verður um, at fíggjarnevndin játtar, at peningurin til keypið verður játtaður av projektinum til smábarnaskúlan hjá Sankta Frans skúla, so keypið kann avgreiðast.

**Tilmæli**
Kommunustjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at kostnaðurin fyri keypið á kr. 288.561,67 verður játtað av projektinum til smábarnaskúlan hjá Sankta Frans skúla.

**Fíggjarnevndin 18. november 2009**: Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 26. november 2009:** Einmælt samtykt.

- Nú komu Levi Mørk, Annfinn Brekkstein og Halla Samuelsen.

**247/09** **<u>2009-1489</u>**

**<u>Ellis- og røktarheim yviri við Strond</u>**

Føroya Løgting hevur 30. apríl 2009 samtykt nýggja lóg um studningslán til bygging av ellis- og røktarheimum. Nú kunnu kommunurnar fáa upp til 50% av byggikostnaðinum, tó í mesta lagi 700.000 kr. pr. búfólk. Løgtingslógin áleggur Almannaráðnum at viðgera umsóknirnar við grundarlagi í tørvinum á eldrabúplássum í upptøkuøkinum.

Tørvurin á røktarheimsplássum í Suðurstreymi fer sambært hagtalsmetingum hjá Hagstovuni helst at økjast í framtíðini. Sum er, eru 145 persónar visiteraðir til eldrabústovn. Av teimum hava um leið 75 ein bráðneyðugan tørv.

Í sambandi við at lógin um studningslán er lýst og sett í gildi hevur Almannamálaráðið við skrivi til Kommunusamskipan Føroya, dagfest 28. mai 2009 heitt á kommununar um innan 1. juli 2009 at koma við umsóknum um stuðul. Umsóknirnar verða viðgjørdar við grundarlagi í tørvinum á eldrabúplássum í upptøkuøkinum og við fakligari ráðgeving frá ávikavist Nærverk og Landsverk.

Fyri at taka eitt munagott stig, sum eisini tryggjar framtíðar tørv, meta samgonguflokkarnir, at kommunan eigur at byggja røktarheim í Tórshavn við 64 búplássum yvir tvey ár treytað av, at landsstýrið veitir stuðul til helvtina av byggikostnaðinum umframt at tryggja raksturin.

**Sosiala nevnd 9. juni 2009:** Ásannandi stóra tørvin á ellis- og røktarheimsplássum í Suðurstreymi samtykkir sosiala nevnd at mæla býráðnum umvegis fíggjarnevndini til, at søkja landsstýrið um studningslán til at byggja røktarheim við 64 búplássum á økið, kommunan hevur ognað sær til endamálið Yviri við Strond.

Samstundis verður heitt á umsitingina um at gera byggiskrá til røktarheim við 64 búplássum Yviri við Strond, og at játta 200.000 kr. til endamálið av íløgum á trivnaðarøkinum ætlað eldraøkinum í 2009.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd.

**Býráðið 25. juni 2009:** Eimælt samtykt.

**Nýtt:**
Við skrivi, dagfest 13. oktober 2009, hevur Almannamálaráðið boðað frá, at landsstýriskvinnan í almannamálum hevur gjørt av at geva kommununi tilsøgn um studningslán á í mesta lagi 44,8 mió. kr. til 64 búpláss.

**Sosiala nevndin 20. oktober 2009:** Nevndin varð kunnað um málið og at Albert Isfelt og Gudmund Hansen, arkitektar, hava fingið arbeiðið at gera byggiskrá

**Ískoyti:**
Ì samband við útbjóðing av arbeiðinum at projektera og byggja nýtt røktarheim Yviri við Strond, skal støða takast til útbjóðingarhátt. Málið er viðgjørt í

arbeiðsbólkinum, sum borgarstjórin hevur sett at fyriskipað ger av byggiskránni. Vísandi til stuðulstilsøgnina frá landsstýrinum, svarandi til kr. 700.000 pr. búpláss, metir arbeiðsbólkurin at miðjast skal eftir at byggja røktarheimið fyri ein prís so tætt uppá 1,4 mió. pr. búpláss, sum til ber. Arbeiðsbólkurin metir, at størstu sannlíkindini eru fyri at røkka hesum, við at bjóða arbeiðið út í umvendari útbjóðing, og sum heildararbeiðstøka. Hesin útbjóðingarháttur krevur, at avgerð verður tikin um samsýning til tilboðsgevarar, hvør mannar dómsnevndina, og hvørji viðurskifti verða løgd til grund fyri avgerð um hvat tilboð kommunan velur.

**Tilmæli:**
Arbeiðsbólkurin mælir í hesum sambandi til fylgjandi:

1. At upp til 5 tilboðsgevarar verða útvaldur við eini pre-kvalifikatión har ásett verða krøv til tekniskan og fíggjarligan førleika, royndir, góðskutryggingarskipanir o.l. krøv, sum umsitingin lýsir.
2. At arbeiðið verður boðið út í innbodnari, umvendari útbjóðing, og sum heildararbeiðstøka, millum teir útvaldu tilboðsgevararnar, ið eru prekvalifiseraðir.
3. At samsýningin til tilboðsgevararnar verður upp til 150.000 pr. uppskot og annars sambært ásetingunum í ABT93, men tó soleiðis, at endaliga samsýningin verður útroknað eftir í hvønn mun innlatin tilboð lúka krøvini í byggiskránni.
4. At dómsnevndin verður mannað við bygginevndini og býararkitektinum. Harumframt kunnu limirnir í arbeiðsbólkinum og onnur fakfólk virkað sum ráðgevarar hjá dómsnevndini.
5. At tilboðini verða mett út frá hesum fortreytum:

| **Evni** | **Vekt í %** | **Stigatalva 1 - 9** | **Stig tilsamans** | **Vektaði prosentstig** |
|---|---|---|---|---|
| Arkitekturur | 20% | | | |
| Funktionalitetur | 20% | | | |
| Tilfar/góðska | 15% | | | |
| Tilboðsupphædd | 20% | | | |
| Samsvar við byggi-skránna (v. fleiri undirpunktum) | 25% | | | |
| | 100% | | | |

**Býráðið 26. november 2009:** Einmælt samtykt.

**248/09** **2009-0387**

**Mál beind í nevndir**

**Býráðið 26. november 2009:** Tikið av skrá.

**MÁL UTTAN FYRI SKRÁ**

**249/09** **2009-2973**

**Hotspot í miðbýnum**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Fyrispurningur er komin frá býráðslimi um, at umsitingin kannar møguleikarnar, at kommunan veitir alnótaratgongd, gjøgnum sokallað 'Hotspots'.

Kt-deildin hevur, fyrr í ár, gjørt ávísar kanningar og fyrispurningar og er tilfarið hjálagt sum skjøl:

- **Skjal 1: Det globale netværk.**
  Danskur serfrøðingur lýsir hvat liggur í hugtakinum 'Det globale netværk' og kemur við fleiri góðum hugtøkum, eins og víst verður á hvussu hetta kann gerast
- **Skjal 2: Løgfrøðislig frágreiðing frá Løgdeildini**
  Løgdeildin heldur ikki, at kommunan hevur rætt ella skyldu til at veita ókeypis tráðleyst alnótasamband til øll.
- **Skjal 3: Svar frá Innlendismálaráðnum**
  Innlendismálaráðið heldur heldur ikki, at tað er í samsvar við kommunufulltrúnna, at kommunan veitir ókeypis alnótasamband til øll.

Uppskotið frá politikaranum um, í fyrstu atløgu, at veita alnóta-atgongd innanhýsis í kommunalum bygningum er eitt gott stað at byrja. Tað er avmarkað til at ganga einari umbøn frá gesti um at fáa alnótasamband inni í einum kommunalum bygningi á møti. Tað er ikki í stríð við løgfrøðina.

Næsta stigið kundi verið at veitt bátagestum, bilgestum og øðrum ferðandi atgongd til alnótina.

Hugtakið 'Hotspot' hevur fleiri týdningar ella loysnir. Við støði í løgfrøðiligu niðurstøðunum er kommunan nakað bundin í hesum málinum. Hóast kommunan kundi keypt eitt ella fleiri tráðleys breiðbandshald til bygningarnar, sum eru í uppskoti, so er tað ikki ein virðilig loysn fyri eina kommunu.

Tað skulu nevniliga gerast kanningar, bæði um hvørjir veitarar skulu veita loysnina, hvør tøkni skal brúkast, hvør skal reka loysnina, og hvørji atlit skulu takast, so tað ikki stendst løgfrøðisligur ruðuleiki av nýtsluni av alnótini.

Vit sleppa sostatt ikki undan stýring av, hvør fær atgongd, so tað setir beinanvegin spurningar um tøkni og mannagongdir, til dømis hvussu ein fær atgongd og hvør skal geva hana. Tørvur á atgongd er ofta eftir vanliga arbeiðstíð, so tað setir avmarkingar til hvør er tøkur. Í uppskotinum standa Reinsaríðið, Perlan og Býarbókasavnið nevnd. Hetta eru støð, har manning er tøk, sum kann veita atgongdina.

Fara vit í aðru syftu at veita ferðandi alnótasamband ber ikki til at siga hvat tað kemur at kosta, tí tað krevur neyvar kanningar. Til at geva atgongdina hava vit tó døgnvakt á Tórshavnar havn og á Sløkkiliðnum.

Tað er upplagt at kanna, um áhugi er millum virkir at reka skipanina.

Hóast alt hetta finst í grannalondunum, so er neyðugt hjá okkum at kanna, hvørji serlig føroysk atlit eru at taka.

Sum útgangspunkt skal brúkarin rinda fyri tænastuna soleiðis, at hon er útreiðsluneutral fyri kommununa.

**Tilmæli:**
Miðfyrisitingarstjórin og KT-leiðarin mæla í fyrstu atløgu til at kanna møguleikan, at uttanhýsis veitarar kunnu loysa uppgávuna.

Í øðrum lagi verður mælt til, at stjórnin mannar ein bólk at gera eina verkætlan, sum fevnir um

- Stig 1: at veita alnótasamband til gestir í Perluni, Reinsarínum og Býarbókasavninum
- Stig 2: at veita alnótasamband til ferðandi

og leggur hana fyri fíggjarnevndina. Samstundis verður mælt til, at settar vera kr 200.000 av til fyrra stigið.

**Fíggjarnevndin 18. november 2009:** Samtykt at taka undir við at kanna møguleikan at uttanhýsis veitarar kunnu loysa uppgávuna.

**Ískoyti:**
Levi Mørk hevur biðið um hetta mál á skrá.

**Býráðið 26. november 2009:** Framlagt.

**250/09** **<u>2005-1430</u>**

**<u>Umval av býráðslimum í bygginevndina Brúgv um Sandá sambært § 36 í kommunulógini</u>.**

**Býráðið 26. november 2009:** Valdir vórðu Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

**FUNDUR LOKIN KL. 22:10**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Sjúrður Olsen | Bogi Andreasen |
| Marin Katrina Frýdal | Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Annfinn Brekkstein | Vagnur Johannesen | Levi Mørk |
| Rúni M. Djurhuus | Jákup Símun Simonsen | Jan Christiansen |
| | Heðin Mortensen | |